Løgmansskrivstovan

Løgtingið

Dagfesting:	21. oktober 2020
Mál nr.:	0617-010/18
Málsviðgjørt:	GMN
Eftirkannað:	22. september 2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven (Revsilógin)
(Landasvik og onnur brotsverk ímóti sjálvsavgerðarrætti og trygd Føroya fólks o.a., brotsverk ímóti stýrisskipanini og landsmyndugleikum føroyinga, yvirgangur o.a., alvandasom brotsverk, ymsar gerðir, sum eru til skaða fyri almenningin, bidding og skaðiligt inntøkuvirksemi og brotsverk í familjuni)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven (Revsilógin)
(Landasvik og onnur brotsverk ímóti sjálvsavgerðarrætti og trygd Føroya fólks o.a., brotsverk ímóti stýrisskipanini og landsmyndugleikum føroyinga, yvirgangur o.a., alvandasom brotsverk, ymsar gerðir, sum eru til skaða fyri almenningin, bidding og skaðiligt inntøkuvirksemi og brotsverk í familjuni)

§ 1

Í Revsilógini, sambært lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939 om straffeloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr.142 frá 9. oktober 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á parti II "Særlig del" verður strikað og í staðin verður sett:

"**Partur II**
Serligur partur"

2. Kapittul 12 verður orðaður soleiðis:

"**Kapittul 12**

Landasvik og onnur brotsverk ímóti sjálvsavgerðarrætti og trygd Føroya fólks o.a.

§ 98. Tann, sum fremur eina gerð, ið miðar eftir við útlendskari hjálp, við valdsnýtslu ella við hóttan um valdsnýtslu at loysa ella leggja Føroyar ella partar av Føroyum undir fremmant vald, verður revsaður við fongsli í upp til lívstíð.
Stk. 2. Eftir ásetingini í stk. 1 verður eisini tann revsaður, sum við nevnda endamáli skipar fyri umfatandi sabotasju, framleiðslustongsli ella ferðslustongsli, og tann, sum luttekur í

slíkum virksemi og er vitandi um endamálið við tí.

§ 99. Tann, sum fremur eina gerð, ið miðar eftir at koma Føroyum ella okkara sameindu út í kríggj, herseting ella annan fíggindaskap, sum til dømis avbyrging ella annan tvingsil, ella sum aðramáta virkar fyri at skerja avgerðarrætt Føroya við útlendskari hjálp, verður revsaður við fongsli í upp til lívstíð.
Stk. 2. Við herseting er her og aðrastaðni í kapitlunum 12 og 13 at skilja fremmand herseting av Føroyum, tá ið og so leingi hon verður sett í verk við valdsnýtslu ella við hóttan um valdsnýtslu.

§ 100. Tann, sum við almennum útsøgnum eggjar til ella sum fremur eyðsýndan vanda fyri fíggindaskapi ímóti Føroyum, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár.
Stk. 2. Tann, sum við almennum útsøgnum eggjar til ella sum fremur eyðsýndan vanda fyri, at fremmandavald leggur seg út í føroysk viðurskifti, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 1 ár.

§ 101. Tann, sum við kríggi, herseting ella øðrum fíggindaskapi í hyggju fremur eina gerð, sum fyrireikar stuðul til fíggindan, verður revsaður við fongsli í upp til 16 ár.

§ 102. Tann, sum í kríggi ella undir herseting stuðlar fíggindanum við ráði ella verki, ella sum fyri at fremja fíggindalig áhugamál veikir stríðsføri ríkisins ella stríðsfelaga tess, verður revsaður við fongsli í upp til 16 ár.
Stk. 2. Sum stuðul til fíggindan eru at rokna hesi viðurskifti:

1) Innskriving til ella hertænasta fyri vápnað lið hjá fíggindaligum hernaðarvaldi ella hersetingarvaldi ella fyri tilknýtta hernaðardeild ella løgregludeild ella aðra tílíka deild ella annan tílíkan felagsskap.
2) Sivilt funktionerarbeiði undir løgreglumyndugleika ella fongsulsmyndugleika hjá fíggindaligum hernaðarvaldi ella hersetingarvaldi, um arbeiðið fevnir um luttøku í avhoyringum ella vaktarhaldi av fangum.
3) Smettan ella líknandi gerð, sum elvir til, at onkur verður handtikin ella verður fyri handtøku ella meini av fíggindaligum myndugleika ella samstarvandi felagsskapi ella persóni.
4) Propaganda fyri fíggindaligt hernaðarvald ella hersetingarvald, herímillum virksemi sum útgevari, ritstjóri ella fyrisitari á dagblaði, tíðarriti, forlagi ella tíðindastovu, sum arbeiðir fyri at fremja fíggindalig áhugamál.
5) Munandi fíggjarligur stuðul til at fremja propagandu soleiðis sum hon er lýst undir nr. 4, ella til flokk ella felagsskap, sum á óhøviligan hátt samstarvar við fíggindaliga hernaðarvaldið ella hersetingarvaldið ella fremur áhugamál tess.

Stk. 3. Er talan um smettan sambært stk. 2, nr. 3, sum er gjørd undir slíkum umstøðum, at gerningsmaðurin hevur skilt, at hann er komin onkrum í hóttandi vanda fyri at missa lívið, fáa munandi skaða á likam ella heilsu, verða førdur av landinum ella verða frælsisskerdur í longri tíð, ella er brot framt á §§ 245, 246 ella 250 fyri á tann hátt at tvinga fram frágreiðing ella játtan ella aðramáta sum liður í mishandling av fangum, kann fongsul upp til lívstíð dømast.

§ 103. Tann, sum í kríggi ella undir herseting, ella tá ið stórur vandi er fyri kríggi ella herseting, misrøkir sáttmála viðvíkjandi fyriskipanum, ið føroyskir myndugleikar av hesi orsøk hava avgjørt at seta í verk, ella sum

aðramáta arbeiðir ímóti slíkum fyriskipanum, verður revsaður við fongsli í upp til 3 ár.
Stk. 2. Er sáttmálin misrøktur av grovum ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 4 mánaðir.

§ 104. Tann, sum á óhøviligan hátt, beinleiðis ella gjøgnum millumlið, samstarvar vinnuliga við fíggindaligt hernaðarvald ella hersetingarvald, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 8 ár.
Stk. 2. Revsiábyrgd eftir stk. 1 kann verða løgd á ein og hvønn, sum hevur havt leiðandi starv í viðkomandi fyritøku. Revsiábyrgd kann somuleiðis verða løgd á onnur starvsfólk í fyritøkuni, um tey fyri sín part hava havt serliga ódámliga framferð.
Stk. 3. Tá ið gjørt verður av, um framferðin hevur verið óhøvilig, og hvussu óhøvilig hon hevur verið, skal umframt týdningin, sum fyritøkan hevur fyri tað fíggindaliga hernaðarvaldið ella hersetingarvaldið, serliga verða havt í huga, um viðkomandi:

1) sjálvur hevur virkað fyri at fáa í lag, halda fram við ella víðka um handilssambandið,
2) til frama fyri fíggindan av sínum eintingum hevur umskipað fyritøkuna ella hevur fingið ella hevur roynt at fáa størri ella skjótari framleiðslu enn kravt,
3) hevur biðið fíggindan hjálpa sær mótvegis føroyskum myndugleikum til frama fyri egin áhugamál,
4) hevur forðað ella roynt at forða føroyskum myndugleikum at fáa fulla atgongd at kunna seg um viðurskifti hjá fyritøkuni, ella
5) hevur fingið ella roynt at fáa órímiligan vinning ella aðrar fyrimunir, sum ikki hava verið rímiliga grundaðir handilsliga.

§ 105. Tann, sum undir herseting fremur eina gerð, ið miðar eftir at fáa hersetingarvaldið ella felagsskap ella persón, ið samstarvar við tað, til at gera seg inn á avgerðarrættin hjá føroyskum myndugleikum, ella sum á óhøviligan hátt misnýtir samband við hersetingarvaldið ella felagsskap ella persón, ið samstarvar við tað, fyri at vinna sær sjálvum ella øðrum serligan fyrimun, verður revsaður við fongsli í upp til 8 ár.

§ 106. Tann, sum virkar ímóti tørvi landsins í starvi, sum honum er latið fyri Føroyar at samráðast um ella avgera eitthvørt við fremmant land, verður revsaður við fongsli í upp til 16 ár.

§ 107. Tann, sum í tænastu fyri fremmant vald ella fremmandan felagsskap ella til nýtslu hjá nøkrum, sum er í slíkari tænastu, kannar ella gevur upplýsingar um viðurskifti, ið skulu haldast loynilig við fyriliti fyri landsáhugamálum ella samfelagsáhugamálum, verður, sama um upplýsingarnar eru rættar ella ei, revsaður fyri njósnan við fongsli í upp til 16 ár.
Stk. 2. Snýr tað seg um viðurskifti, sum nevnd eru í § 109, ella verður gerðin framd í kríggi ella undir herseting, kann revsingin vaksa til fongsul í upp til lívstíð.

§ 108. Tann, sum, hóast gerðin ikki kemur undir § 107, í aðramáta ger nakað, sum gevur fremmandari fregnartænastu møguleikan til, ella sum hjálpir henni til beinleiðis ella óbeinleiðis at virka í landinum, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár.
Stk. 2. Snýr tað seg um upplýsingar um hernaðarlig viðurskifti, ella verður virksemið framt í kríggi ella undir herseting, kann revsingin vaksa til fongsul í upp til 12 ár.

§ 109. Tann, sum avdúkar ella víðarigevur upplýsingar um loyniligar samráðingar, ráðleggingar ella avgerðir hjá landinum í málum, sum trygd landsins ella rættindi við fremmand lond er treytað av, ella sum snúgva seg um týðandi samfelagsbúskaparlig áhugamál við útlond, verður revsaður við fongsli í upp til 12 ár.
Stk. 2. Verða nevndu gerðir gjørdar av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 3 ár.

§ 110. Tann, sum falsar, oyðileggur ella burturbeinir skjal ella lut, sum hevur týdning fyri trygd landsins ella rættindi við fremmand lond, verður revsaður við fongsli í upp til 16 ár.
Stk. 2. Verða nevndu gerðir gjørdar av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 3 ár.

§ 110 a. Við sekt ella fongsli í upp til 3 ár verður tann revsaður, sum tilætlað ella av ósketni uttan neyðugt loyvi:

1) greiðir frá, tekur mynd av ella á annan hátt avmyndar hernaðarligar verjustøðir, goymslur, deildir, vápn, útgerð ella tílíkt hjá ríkinum, sum ikki er almannaatgongt, ella sum margfaldar ella almannakunnger tílíkar frágreiðingar ella myndir, ella
2) almannakunnger avgerðir, sum snúgva seg um herbúgving til stríð ella aðra hernaðartilbúgving hjá ríkinum.

§ 110 b. Við fongsli í upp til 8 ár verður tann revsaður, sum viðvirkar til, at fremmandavald ger seg inn á uttanveltastøðu ríkisins.

§ 110 c. Tann, sum brýtur áseting ella forboð, ið givin eru sambært lóg sum vernd av verjufyriskipan ella uttanveltafyriskipan ríkisins, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 4 mánaðir ella undir serliga skerpandi umstøðum við fongsli í upp til 3 ár.
Stk. 2. Við sekt ella fongsli í upp til 4 mánaðir ella undir serliga skerpandi umstøðum við fongsli í upp til 4 ár verður tann revsaður, sum brýtur áseting ella forboð, ið givin eru sambært lóg fyri at kunna røkja skyldur ríkisins sum limur í Sameindu Tjóðum.
Stk. 3. Verður brot framt á stk. 1 ella 2 av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 2 ár.

§ 110 d. Verður nakað av teimum brotsverkum, sum lýst eru í kapitlunum 25, 26 og 27, framt ímóti útlendskum ríkisleiðara ella leiðara á útlendskari sendistovu, kann revsingin, sum har er lýst, vaksa við upp í eina helvt, um ikki gerðin er fevnd av kapitli 13.

§ 110 e. Við sekt ella fongsli í upp til 2 ár verður tann revsaður, sum alment háðar fremmanda tjóð, fremmant land, flagg tess ella annað viðurkent tjóðarmerki ella flaggið hjá Sameindu Tjóðum.

§ 110 f. Brotsverk í hesum kapitli verða altíð lógsøkt við almennari átalu eftir boðum frá løgmálaráðharranum.

§ 110 g. Á sama hátt verður tann revsaður, sum fremur tær í §§ 98-110 nevndu gerðir mótvegis danska statinum ella myndugleikum hansara herundir kongi, Fólkatingi og Hægstarætti."

3. Kapittul 13 verður orðaður soleiðis:

"**Kapittul 13**
Brotsverk ímóti stýrisskipan og landsmyndugleikum føroyinga, yvirgangur o.a.

§ 111. Tann, sum fremur eina gerð, ið miðar eftir við útlendskari hjálp, valdsnýtslu ella hóttan um valdsnýtslu at broyta stýrisskipanina ella at seta

hana úr gildi, verður revsaður við fongsli í upp til lívstíð.

§ 112. Tann, sum fremur eina gerð, ið miðar eftir at taka lívið av tí, sum við heimild í stýrisskipanini leiðir landsstýrið, verður revsaður við fongsli í minst 6 ár.

§ 113. Tann, sum ger seg inn á trygd ella frælsi Løgtingsins ella aðramáta fremur eina gerð, ið miðar eftir við valdsnýtslu ella hóttan um valdsnýtslu at noyða Løgtingið til at taka eina avgerð ella at forða tí í at virka frítt og frælst, verður revsaður við fongsli í upp til 16 ár ella undir serliga skerpandi umstøðum við fongsli í upp til lívstíð.
Stk. 2. Somu revsing fær tann, sum á samsvarandi hátt loypur á ella fremur tvingsil ímóti tí, sum við heimild í stýrisskipanini leiðir landsstýrið, ella ímóti landsstýrismonnum.

§ 114. Fyri yvirgang verður tann revsaður við fongsli í upp til lívstíð, sum við ætlan um at loypa stóra ræðslu á íbúgvarnar í einum landi, ella av órøttum at tvinga føroyskar ella útlendskar almennar myndugleikar ella altjóða felagsskap til at gera ella lata vera við at gera okkurt, ella at avlaga ella oyðileggja grundleggjandi politiska, stýrisskipanarliga, búskaparliga ella samfelagsliga bygnaðin í einum landi ella altjóða felagsskapi, fremur eina ella fleiri av fylgjandi gerðum, tá ið slag av gerð ella samanhangurin, gerðin verður framd í, kann gera einum landi ella altjóða felagsskapi munandi skaða:

1) Manndráp eftir § 237.
2) Grovan harðskap eftir §§ 245 ella 246.
3) Frælsistøku eftir § 261.
4) Órógv á ferðslutrygdina eftir § 184, stk. 1, ólógligt órógv á raksturin av vanligum samferðslutólum o.ø. eftir § 193, stk. 1, ella umfatandi herverk eftir § 291, stk. 2, um hesi lógarbrot verða framd á ein hátt, sum kann koma mannalívum í vanda ella hava við sær munandi fíggjarligt tap.
5) Rán av flutningsfari eftir § 183 a.
6) Brot á lóggávuna um vápn og spreingievni undir serliga skerpandi umstøðum eftir § 192 a.
7) Eldáseting eftir § 180, spreinging, spjaðing av skaðaelvandi loftevni, vatnflóð, skipbrot ella aðra flutningsvanlukku eftir § 183, stk. 1 og 2, heilsuskaðiliga dálking av vatnveiting eftir § 186, stk. 1, heilsuskaðiliga dálking av lutum, ætlað til vanliga útbreiðslu o.a. eftir § 187, stk. 1.
8) Handhavan ella nýtslu o.a. av geislavirknum evnum eftir § 192 b.

Stk. 2. Á sama hátt verður tann revsaður, sum við teirri tilætlan, ið nevnd er í stk. 1, flytur vápn ella spreingievni.
Stk. 3. Á sama hátt verður eisini tann revsaður, sum við teirri tilætlan, ið nevnd er í stk. 1, hóttir við at fremja onkra av teimum gerðum, sum nevndar eru í stk. 1 og 2.

§ 114 a. Verður ein av gerðunum í nr. 1-7 framd, uttan at treytirnar fyri at revsa eftir § 114 eru til staðar, kann revsingin fara upp um strangastu revsingina fyri lógarbrotið við upp í eina helvt. Er strangasta revsing fyri viðkomandi gerð minni enn 4 ára fongsul, kann hon tó vaksa til fongsul í upp til 6 ár:

1) Brot á § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 ella 2, § 183 a, § 184, stk. 1, § 192 a, § 193, stk. 1, §§ 237, 244-246, 250, § 252, stk. 1, § 266, § 288 ella § 291, stk. 1 ella 2, tá ið gerðin er fevnd av artikli 1 í millumtjóðasáttmála frá 16. desember 1970 um at basa ólógligari valdstøku av loftførum, artikli 1 í millumtjóðasáttmála frá 23. september 1971 um at basa

ólógligum gerðum ímóti trygdini í sivilu loftferðsluni ella artikli 2 í ískoytissáttmálanum frá 24. februar 1988 um at basa ólógligum valdsgerðum í floghavnum, sum avgreiða altjóða sivilu loftferðsluna, sambært skjali 1, nr. 1 og 2.

2) Brot á § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 ella 2, § 184, stk. 1, §§ 237, 244-246, 250, § 252, stk. 1, § 260, § 261, stk. 1 ella 2, § 266 ella § 291, stk. 1 ella 2, tá ið gerðin er fevnd av artikli II í millumtjóðasáttmála frá 14. desember 1973 um at fyribyrgja og revsa brotsverk ímóti altjóða vardum persónum, herímillum sendifólkum, sambært skjali 1, nr. 3.
3) Brot á § 261, stk. 1 ella 2, tá ið gerðin er fevnd av artikli 1 í millumtjóðasáttmála frá 17. desember 1979 ímóti gíslatøku, sambært skjali 1, nr. 4.
4) Brot á § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 ella 2, § 186, stk. 1, §§ 192 a, 192 b, 237, 244-246, 260, 266, 276, 278, 279, 279 a, 281, 288 ella § 291, stk. 2, tá ið gerðin er fevnd av artikli 7 í IAEA-sáttmálanum, Sáttmálanum hjá The International Atomic Energy Agency, frá 3. mars 1980 um fysiska vernd av kjarnorkutilfari, sambært skjali 1, nr. 5.
5) Brot á § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 ella 2, § 183 a, § 184, stk. 1, § 192 a, § 193, stk. 1, §§ 237, 244–246, § 252, stk. 1, §§ 260, 266, 288 ella § 291, stk. 1 ella 2, tá ið gerðin er fevnd av artikli 3 í millumtjóðasáttmála frá 10. mars 1988 um at basa ólógligum gerðum ímóti sjótrygdini ella artikli 2 í ískoytissáttmálanum frá 10. mars 1988 um at basa ólógligum gerðum ímóti trygdini á fastfestum oljupallum á landgrunninum, sambært skjali 1, nr. 6 og 7.
6) Brot á § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 ella 2, § 183 a, § 184, stk. 1, § 186, stk. 1, § 192 a, § 193, stk. 1, §§ 237, 244-246, 250, § 252, stk. 1, § 266 ella § 291, stk. 2, tá ið gerðin er fevnd av artikli 2 í millumtjóðasáttmála frá 15. desember 1997 um at basa yvirgangsbumbing, sambært skjali 1, nr. 8.
7) Brot á § 192 b, § 260 ella § 266, tá ið gerðin er fevnd av artikli 2 í millumtjóðasáttmála frá 13. apríl 2005 um at basa kjarnorkuyvirgangi, sambært skjali 1, nr. 9.

§ 114 b. Við fongsli í upp til 10 ár verður tann revsaður, sum beinleiðis ella óbeinleiðis til ein persón, til ein bólk ella til eina samskipan, sum fremur ella ætlar at fremja eina gerð, sum er fevnd av §§ 114 ella 114 a:

1) veitir fíggjarstuðul,
2) útvegar ella savnar inn fígging ella onnur ráð, ella
3) letur pening, ognarlutir ella fíggjarligar ella aðrar slíkar veitingar at ráða yvir.

§ 114 c. Við fongsli í upp til 10 ár verður tann revsaður, sum útvegar ein persón til at fremja ella stuðla undir gerðir, ið fevndar eru av §§ 114 ella 114 a, ella til at fara upp í ein bólk ella eina samskipan fyri at stuðla undir, at bólkurin ella samskipanin fremur gerðir av hesum slag. Undir serliga skerpandi umstøðum kann revsingin vaksa til fongsul upp í 16 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna brot, sum eru av regluligum ella skipaðum slag.

Stk. 2. Við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum útvegar ein persón til at fremja ella stuðla undir gerðir, ið fevndar eru av § 114 b, ella til at fara upp í ein bólk ella eina samskipan fyri at stuðla undir, at bólkurin ella

samskipanin fremur gerðir av hesum slag.
Stk. 3. Við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum tekur við boði at fremja gerðir, ið fevndar eru av §§ 114 ella 114 a. Virkar viðkomandi fyri eitt vápnað lið, kann revsingin vaksa til fongsul upp í 10 ár ella undir serliga skerpandi umstøðum til fongsul upp í 16 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna slíkar, har viðkomandi hevur verið við í bardaga.

§ 114 d. Við fongsli í upp til 10 ár verður tann revsaður, sum venur, vegleiðir ella á annan hátt lærir upp ein persón at fremja ella stuðla undir gerðir, ið eru fevndar av §§ 114 ella 114 a, vitandi um, at persónurin ætlar at nýta førleikarnar til hetta endamál. Undir serliga skerpandi umstøðum kann revsingin vaksa til fongsul upp í 16 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna brot, sum eru av regluligum ella skipaðum slag.
Stk. 2. Við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum venur, vegleiðir ella á annan hátt lærir upp ein persón at fremja ella stuðla undir gerðir, ið eru fevndar av § 114 b, vitandi um, at persónurin ætlar at nýta teir tillærdu førleikarnar til hetta endamál.
Stk. 3. Við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum letur seg venja, vegleiða ella á annan hátt læra upp at fremja gerðir, ið eru fevndar av §§ 114 ella 114 a.

§ 114 e. Við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum á annan hátt stuðlar virksemi hjá persóni, bólki ella samskipan, sum fremur ella ætlar at fremja gerðir, ið eru fevndar av §§ 114, 114 a, 114 b, 114 c ella 114 d. Virkar viðkomandi fyri eitt vápnað lið, kann revsingin vaksa til fongsul í upp til 10 ár ella undir serliga skerpandi umstøðum til fongsul í upp til 16 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna slíkar, har viðkomandi hevur verið við í bardaga.

§ 114 f. Tann, sum, uttan at tilburðurin er fevndur av §§ 114-114 e, luttekur í ella veitir munandi fíggjarstuðul ella annan munandi stuðul til deildir, bólkar ella samskipanir, sum við valdsnýtslu ætla at ávirka almenn viðurskifti ella at elva til órógv á samfelagsskipanina, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár.

§ 114 g. Tann, sum, uttan at tilburðurin er fevndur av §§ 114-114 f, luttekur í ólógligum hernaðarligum felagsskapi ella bólki, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár.

§ 114 h. Tann, sum frá bólki ella samskipan, ið fremur ella ætlar at fremja gerðir, ið eru fevndar av §§ 114 ella 114 a, tekur ímóti peningaligum stuðli ella veitingum at brúka til at skipa ella reka stovn ella fyritøku ella til líknandi endamál her á landi, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár.

§ 115. Verður brotsverk, sum nevnt er í kapitlunum 25, 26 og 27, gjørt ímóti tí, sum við heimild í stýrisskipanini leiðir landsstýrið, uttan at treytirnar fyri at revsa eftir §§ 112 og 113 eru til staðar, verða revsingarnar, sum har eru lýstar, herdar upp til tað dupulta.

§ 116. Tann, sum forðar ella roynir at forða fyri, at val verður hildið til Løgtingið, Fólkatingið, kommunustýri ella til kommunal ella onnur almenn ráð ella myndugleikar, ella sum reingir valúrslit, ella sum ger tað ómøguligt at gera úrslitið upp, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár.
Stk. 2. Sama revsing verður nýtt, tá ið slíkar gerðir verða gjørdar í sambandi við lógarheimilaðar beinleiðis atkvøðugreiðslur um almenn viðurskifti.

§ 117. Við sekt ella fongsli í upp til 2 ár verður tann revsaður, sum á teimum valum ella atkvøðugreiðslum, ið nevnd eru í § 116:

1) av órøttum skaffar sær ella øðrum atgongd til at luttaka í atkvøðugreiðsluni,
2) við ólógligum tvingsli sambært § 260 við frælsistøku ella við misnýtslu av støðu síni í hægri starvi roynir at fáa onkran til at atkvøða á ávísan hátt ella til at lata vera við at atkvøða,
3) við sviki elvir til, at onkur ímóti ætlan síni letur vera við at atkvøða, ella at atkvøðan hjá viðkomandi verður ógildig ella virkar øðrvísi enn ætlað,
4) veitir, lovar ella bjóðar fram fíggjarligan fyrimun fyri at ávirka onkran til at atkvøða á ávísan hátt ella til at lata vera við at atkvøða, ella
5) tekur ímóti, krevur ella letur lova sær fíggjarligan fyrimun fyri at atkvøða á ávísan hátt ella til at lata vera við at atkvøða.

§ 118. Tann, sum við valdsnýtslu ella hóttan um valdsnýtslu ella við misnýtslu av ótta fyri uppílegging frá fremmandavaldi forðar ella roynir at forða almennum myndugleika í at virka frítt og frælst, verður, tá ið gerðin verður framd fyri at ávirka almenn viðurskifti ella at elva til órógv á samfelagsskipanina, revsaður við fongsli í upp til 12 ár.
Stk. 2. Somu revsing fær tann, sum við teirri ætlan og tí framferðarhátti, sum nevnd eru í stk. 1, ger seg álvarsliga inn á framsøgufrælsið ella forðar felagsskapum ella øðrum samskipanum í at útinna lógliga virksemi sítt frítt og frælst.
Stk. 3. Somu revsing fær eisini tann, sum við teirri ætlan og tí framferðarhátti, sum nevnd eru í stk. 1, fremur tað brotsverk, sum umrøtt er í § 193, ella aðra alvandasama gerð.

§ 118 a. Brotsverkini, sum nevnd eru í §§ 111-115 og 118, verða altíð lógsøkt við almennari átalu eftir boðum frá løgmálaráðharranum.

§ 118 b. Á sama hátt verður tann revsaður, sum fremur tær í §§ 111-116 nevndu gerðir ímoti danska statinum ella myndugleikum hansara herundir kongi, Fólkatingi og Hægstarætti.
Stk. 2. Verður brotsverk, sum nevnt er í kapitlunum 25, 26 og 27, framt ímóti kongi, uttan at treytirnar fyri at revsa eftir §§ 112 og 113 eru til staðar, verða revsingarnar, sum har eru lýstar, herdar upp til tað dupulta.
Stk. 3. Verður eitt av nevndu brotsverkum framt ímóti drotning, einkjudrotning ella trónuarvinga, kann revsingin vaksa við upp í eini helvt."

4. Kapittul 20 verður orðaður soleiðis:

"**Kapittul 20**
Alvandasom brotsverk

§ 180. Setur onkur eld á egna ella annans ogn undir slíkum umstøðum, at hann skilur, at hann harvið setur lívið hjá øðrum í hóttandi vanda, ella hann ger tað við tilætlan um at gera umfatandi skaða á annans ogn ella til at fremja uppreistur, púrgan ella aðra slíka órógv á samfelagsskipanina, verður hann revsaður við fongsli í upp til lívstíð.

§ 181. Tann, sum annars elvir til eldsbruna á annans ogn, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár.
Stk. 2. Á sama hátt verður tann revsaður, sum við tilætlan um at svika brunatryggingina ella at gera seg inn á rættindi hjá veðhava, ella sum við líknandi løgleysari tilætlan elvir til eldsbruna á egna ogn ella á annans ogn við samtykki eigarans.

Stk. 3. Revsingin kann vaksa til fongsul í upp til 10 ár, um talan er um serliga skerpandi umstøður.

§ 182. Tann, sum av ósketni elvir til eldsbruna á annans ogn ella til bága fyri annans ognaráhugamál, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár.

§ 183. Tann, sum við tilætlan um at gera skaða á annan persón ella annans ogn elvir til spreinging, at skaðaelvandi luftevni verða spjadd, vatnflóð, skipbrot ella aðra flutningsvanlukku, verður revsaður við fongsli í upp til 12 ár.
Stk. 2. Verður ein gerð, sum nevnd er í stk. 1, framd undir teimum umstøðum, sum nevndar eru í § 180, er revsingin fongsul í upp til lívstíð.
Stk. 3. Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 2 ár.

§ 183 a. Tann, sum við ólógligum tvingsli sambært § 260 tekur ræðið á loftfari, sjófari ella øðrum felagsflutningsfari ella farmaflutningsfari ella órógvar stýringina, verður revsaður við fongsli í upp til lívstíð.
Stk. 2. Á sama hátt verður tann revsaður, sum við ólógligum tvingsli sambært § 260 tekur ræðið á frálandsvirki.

§ 184. Við sekt ella fongsli í upp til 2 ár ella undir serliga skerpandi umstøðum við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum, uttan at vera revsisekur eftir §§ 183 ella 183 a, órógvar rakstrartrygdina hjá førum, motorakførum ella slíkum flutningsførum ella ferðslutrygdina á leiðum, ið ætlaðar eru til almenna ferðslu.
Stk. 2. Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 4 mánaðir.

§ 185. Við sekt ella fongsli í upp til 2 ár verður tann revsaður, sum, hóast tað hevði borið honum til, uttan at hann ella onnur skuldu ovofrað seg, og uttan at hann skuldi komið sær sjálvum ella øðrum í nakran serligan vanda, letur vera við at geva rættstundis fráboðan um ella á annan eftir umstøðunum hóskandi hátt eftir førimuni at forða fyri eldsbruna, spreinging, at skaðaelvandi luftevni verða spjadd, vatnflóð, sjóskaða ella slíkari vanlukku, sum hevur við sær vanda fyri mannalívi.

§ 186. Tann, sum elvir til vanda fyri lívi ella heilsu manna við at elva til drekkivatnstrot ella við at lata heilsuskaðilig evnir í vatngoymslur, vatnleiðingar ella áir, verður revsaður við fongsli í upp til 10 ár.
Stk. 2. Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 1 ár.

§ 187. Við fongsli í upp til 10 ár verður tann revsaður:
1) sum í lutir, ið eru ætlaðir til at selja ella til algongda nýtslu, letur eitur ella onnur evni, soleiðis at heilsan hjá fólki kemur í vanda, um lutirnir verða brúktir samsvarandi endamálinum,
2) sum, tá ið slíkir lutir eru komnir soleiðis fyri spillu, at njótingin ella nýtslan av teimum á nevnda hátt er heilsuskaðilig, gevur teimum eina viðgerð, sum kann fjala spilluna, ella
3) sum við dyljing um framdu viðgerðina, setur til sølu ella aðramáta roynir at breiða út lutir, ið eru viðgjørdir soleiðis, sum nevnt er undir nr. 1 og 2.

Stk. 2. Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 1 ár.

§ 188. Við sekt ella fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum, uttan at vera revsisekur eftir § 187, stk. 1, nr. 3, við dyljing um heilsuskaðiliga standin á lutinum setur til sølu ella aðramáta roynir at fáa breitt út:

1) føðsluevni ella njótingarevni, sum orsakað av spillu, vantandi tilgerð, goymsluhátti ella av líknandi orsøkum eru heilsuskaðilig, ella
2) nýtslulutir, sum við vanligum brúki seta heilsu manna í vanda.

Stk. 2. Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 4 mánaðir.

§ 189. Tann, sum setur til sølu ella aðramáta roynir at breiða út sum heilivág ella sjúkufyribyrgjandi evni, lutir, sum hann veit ikki eru nýtiligir til hesi endamál, og at nýtslan av teimum hartil setur lív ella heilsu manna í vanda, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 6 ár.
Stk. 2. Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 4 mánaðir.

§ 190. Verður undir samsvarandi treytum sum í §§ 186-189 bert lív ella heilsa hjá húsdýrum sett í vanda, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 6 ár.

§ 191. Tann, sum ímóti lóggávuni um euforiserandi evni til fleiri persónar ella fyri munandi gjald ella undir øðrum serliga skerpandi umstøðum avhendir slík evni, verður revsaður við fongsli í upp til 10 ár. Er talan um avhending av munandi mongd av serliga vandamiklum ella skaðiligum evni, ella hevur avhendingin av slíkum evni á annan hátt verið av serliga vandamiklum slag, kann revsingin vaksa til fongsul upp í 16 ár.
Stk. 2. Somu revsing fær tann, sum ímóti lóggávuni um euforiserandi evni innflytur, útflytur, keypir, útflýggjar, tekur ímóti, framleiðir, viðger ella hevur um hendi slík evni við tilætlan um at avhenda tey, soleiðis sum nevnt er í stk. 1.

§ 191 a. Tann, sum ímóti løgtingslóg um forboð móti ávísum dopingevnum til fleiri persónar ella fyri munandi gjald ella undir øðrum serliga skerpandi umstøðum avhendir slík evni, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár.
Stk. 2. Somu revsing fær tann, sum ímóti løgtingslóg um forboð móti ávísum dopingevnum framleiðir, innflytur, útflytur, útbreiðir ella hevur um hendi slík evni við tilætlan um at avhenda tey, soleiðis sum nevnt er í stk. 1.

§ 192. Tann, sum við broti á forskriftir, sum givnar eru við lóg ella sambært lóg til at fyribyrgja ella tálma smittusjúku, elvir til vanda fyri, at slík sjúka kemur inn í landið ella breiðir seg millum manna, verður revsaður við fongsli í upp til 3 ár.
Stk. 2. Er talan um sjúku, sum sambært lóggávu krevur almenna viðgerð, ella sum er undir almennari viðgerð, tá ið gerðin verður framd, ella sum serlig tiltøk eru sett í verk til at verja fyri, at sjúkan kemur inn í landið, er revsingin fongsul upp til 6 ár.
Stk. 3. Tann, sum á nevnda hátt elvir til vanda fyri, at smittusjúka kemur inn í landið ella breiðir seg millum húsdýr ella millum nýtsluplantur ella aliplantur, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár.
Stk. 4. Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 6 mánaðir.

§ 192 a. Tann, sum ímóti løgtingslóg um vápn o.a. undir serliga skerpandi umstøðum hevur skotvápn um hendi, hevur skotvápn uppi á sær ella nýtir skotvápn, verður revsaður við fongsli í upp til 4 ár, tá ið brotið fer fram á

einum stað, har frítt er hjá almenninginum at koma.

§ 192 b. Tann, sum við tilætlan um at gera skaða á annan persón ella munandi skaða á annans lutir ella á umhvørvið tekur ímóti, hevur um hendi, avhendir ella broytir geislavirkin evni ella framleiðir ella hevur um hendi sprongkvæman kjarnorkuútbúnað ella útbúnað, sum er ætlaður til at breiða út geislavirkin evni ella kann senda út jónandi geisling, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár.
Stk. 2. Við fongsli í upp til 12 ár verður tann revsaður, sum við tilætlan um at gera skaða á annan persón ella munandi skaða á annans lutir ella á umhvørvið ella at tvinga onkran til at gera ella lata vera við at gera okkurt:
1) nýtir geislavirkin evni ella útbúnað, sum sendir út jónandi geisling,
2) tekur burtur, broytir ella ger skaða á eina neyðuga verju ímóti útbreiðslu av geislavirknum evnum ella ímóti jónandi geisling, ella
3) nýtir ella ger skaða á eitt kjarnorkuverk við teirri fylgju, at tað kemur útlát av geislavirknum evni, ella at tað gerst vandi fyri tí.

Stk. 3. Verður ein gerð, sum nevnd er í stk. 2, framd undir teimum umstøðum, sum nevndar eru í § 180, ella hevur hon við sær umfatandi skaða á umhvørvið, ella at tað verður elvt til nærliggjandi vanda fyri tí, er revsingin fongsul í upp til lívstíð.
Stk. 4. Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 2 ár."

5. Kapittul 21 verður orðaður soleiðis:

"**Kapittul 21**
Ymsar gerðir, sum eru til skaða fyri almenningin

§ 193. Tann, sum á løgleysan hátt elvir til umfatandi órógv í rakstrinum av vanligum samferðslutólum, almennum postflutningi, telegrafútbúnaði ella telefonútbúnaði, útvarpsútbúnaði ella sjónvarpsútbúnaði, kunningarskipanum ella útbúnaði til vanliga veiting av vatni, gassi, elektriskum streymi ella hita, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 6 ár.
Stk. 2. Verður brotsverkið framt av grovum ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 6 mánaðir.

§ 194. Tann, sum tekur burtur, oyðileggur ella ger skaða á almenn minnismerki ella lutir, sum eru ætlaðir til vanliga nýtslu ella prýði, hoyra til almenn søvn ella eru serliga friðað, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 3 ár.

§ 195. Tann, sum setur matvøru til sølu, vitandi um, at hon er eftirgjørd ella falsað, uttan at hetta á ótvískildan hátt stendur á vøruni sjálvari, merkiseðlinum ella innpakkingini og á fakturanum, um slíkur verður latin, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 3 mánaðir.

196. Við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum undir skerpandi umstøðum ímóti umhvørvislóggávuni:
1) dálkar luft, vatn, jørð ella undirgrund við teirri fylgju, at munandi skaði kemur á umhvørvið, ella at tað verður elvt til nærliggjandi vanda fyri tí, ella
2) goymir ella burturbeinir burturkast ella líknandi evni við teirri fylgju, at munandi skaði kemur á umhvørvið, ella at tað verður elvt til nærliggjandi vanda fyri tí.

Stk. 2. Á sama hátt verður tann revsaður, sum ímóti umhvørvislóggávuni dálkar luft, vatn, jørð ella undirgrund ella goymir ella burturbeinir burturkast ella líknandi evni, tá ið brotið er av meira regluligum ella skipaðum slag."

6. Kapittul 22 verður orðaður soleiðis:

"**Kapittul 22**
Bidding og skaðiligt inntøkuvirksemi

§ 197. Tann, sum ímóti ávaring frá løgregluni ger seg sekan í at bidda, ella sum loyvir, at nakar undir 18 ár, sum hoyrir til húski hansara, biddar, verður revsaður við fongsli í upp til 6 mánaðir. Undir linnandi umstøðum kann revsingin detta burtur. Ávaring sambært hesi áseting hevur gildi í 5 ár.

§ 198. (Strikað).

§ 199. Gongur nakar fyri einki undir slíkum umstøðum, at orsøk er at halda, at hann ikki roynir at vinna sær til lívsins uppihald á lógligan hátt, skal viðkomandi frá løgregluni fáa boð um at søkja sær lógligt starv innan ásetta rímiliga freist ella, um til ber, fáa slíkt starv ávíst. Ger hann ikki eftir boðunum, verður hann revsaður við fongsli í upp til 1 ár. Boðini frá løgregluni galda í 5 ár.
Stk. 2. Sum lógligt starv er ikki at rokna spæl, prostitutión ella stuðul frá persónum, sum arbeiða sum prostituerað.

§§ 200–202. (Strikaðar).

§ 203. Tann, sum roynir at vinna sær til lívsins uppihald við váðaspæli ella samsvarandi vedding, sum ikki er loyvt sambært serligari áseting, ella sum fremur slíkt spæl, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 1 ár.
Stk. 2. Rætturin ger av, um vinningurin skal verða inndrigin ella afturgoldin.

§ 204. Tann, sum á almennum stað hýsir ella fyriskipar óloyvdum váðaspæli, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 6 mánaðir.
Stk. 2. Sum alment stað er eisini at rokna felagshøli, tá ið antin øll ella øll í ávísari samfelagsstætt vanliga kunnu innlimast í felagið, ella tá ið óloyvt váðaspæl er partur av endamáli felagsins, ella tá ið serligt gjald verður goldið fyri at luttaka í spælinum.
Stk. 3. Tann, sum á almennum stað luttekur í óloyvdum váðaspæli, verður revsaður við sekt.

§§ 205–207. (Strikaðar)."

7. Kapittul 23 verður orðaður soleiðis:

"Kapittul 23
Brotsverk í familjuni

§ 208. Tann, sum longu er giftur og gongur í hjúnalag, verður revsaður við fongsli í upp til 3 ár ella, um hin persónurin hevur verið óvitandi um verandi giftu, við fongsli í upp til 6 ár.
Stk. 2. Verður gerðin framd av grovum ósketni, er revsingin fongsul upp til 1 ár.
Stk. 3. Tann, sum uttan sjálvur at vera giftur gongur í hjúnalag við einum, sum longu er giftur, verður revsaður við fongsli í upp til 1 ár.
Stk. 4. Tað skal roknast sum linnandi umstøður fyri tann, sum longu er giftur, um síðsta gifta ikki kann ógildast. Undir somu treytum kann revsingin heilt detta burtur fyri tann, sum ikki er giftur.

§ 209. (Strikað).

§ 210. Tann, sum hevur samlegu við skyldfólk í fallandi legg, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár. Ættleiðing verður javnsett við lívfrøðiligan skyldskap.
Stk. 2. Tann, sum hevur samlegu við bróður sín ella systur sína, verður revsaður við fongsli í upp til 2 ár. Revsingin kann detta burtur hjá tí, sum er undir 18 ár.
Stk. 3. Ásetingarnar í stk. 1 og 2 galda eisini fyri aðrar kynsligar gerðir enn samlegu.

§§ 211–212. (Strikaðar).

§ 213. Tann, sum við vanrøkt ella niðrandi viðferð ger seg inn á hjúnafelaga sín, barn sítt ella annan persón undir 18 ár, sum er undir hansara myndugleika ella umsorgan, ella skyldfólk ella svágd í rísandi legg, ella sum andhugaður sleppir sær undan uppihaldsskyldu ella gjaldskyldu, sum honum er áløgd yvir fyri einum av nevndu persónum, og harvið kemur teimum í neyð, verður revsaður við fongsli í upp til 2 ár.

§ 214. (Strikað).

§ 215. Tann, sum heldur einum persóni undir 18 ár frá myndugleika ella umsorgan hjá foreldrum ella øðrum røttum viðkomandi, ella sum stuðlar uppundir, at persónurin skilur seg frá slíkum myndugleika ella slíkari umsorgan, verður revsaður eftir reglunum í § 261.
Stk. 2. Á sama hátt verður tann revsaður, sum ólógliga førir barnið út úr landinum."

8. Í § 125 a, 2. pkt. verður "tá ið talan er um reglulig ella skipað brotsverk" broytt til: "tá ið talan er um brot av meira regluligum ella skipaðum slag".

9. Í § 236, stk. 1, 2. pkt verður "har ið talan er um regluliga ella skipaða útbreiðslu" broytt til: "har ið útbreiðslan er av meira regluligum ella skipaðum slag".

10. Í § 236, stk. 2 verður "eigur ella keypir" broytt til: "hevur um hendi ella ímóti gjaldi".

11. Í § 252, stk. 1 verður "hóttandi vanda" broytt til: "nærliggjandi vanda".

12. § 263, stk. 3, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
"Á sama hátt verða tær gerðir, ið eru nevndar í stk. 2, revsaðar, um talan er um brot av meira regluligum ella skipaðum slag."

13. Í § 293, stk. 2, 2. pkt. verður "um talan er um regluligt ella skipað brot" broytt til: "um talan er um brot av meira regluligum ella skipaðum slag".

14. Í § 299 a, 2. pkt. verður "sannlíkan vanda" broytt til: "nærliggjandi vanda".

15. Bilag 1 í Revsilógini, sambært lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939 om straffeloven, verður orðað sum ásett í skjali 1.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021, og samstundis fer lov nr. 149 af 2. august 1914 hvorved det forbydes fra dansk territorium at understøtte krigsførende magter úr gildi.

Skjal 1

“**Skjal 1**

Ásetingar, ið víst verður til í § 114 a í revsilógini:

1) Artikul 1 í millumtjóðasáttmála frá 16. desember 1970 um at basa ólógligari valdstøku av loftførum:

“*Artikel 1*

Enhver, som om bord i et luftfartøj under flyvning

a) uretsmæssigt, ved vold eller trussel herom, eller ved enhver anden form for trussel bemægtiger sig eller udøver kontrol over luftfartøjet, eller forsøger at udføre en sådan handling, eller
b) medvirker til, at en anden udfører eller forsøger at udføre enhver sådan handling, begår en forbrydelse (herefter betegnet “forbrydelsen”).”

2) Artikul 1 í millumtjóðasáttmála frá 23. september 1971 um at basa ólógligum gerðum ímóti trygdini í sivilu loftferðsluni:

“*Artikel 1*

1. En person gør sig skyldig i en forbrydelse, hvis han ulovligt og forsætligt

a) foretager en voldshandling mod en person om bord i et luftfartøj under flyvning, dersom denne handling må antages at bringe luftfartøjets sikkerhed i fare; eller
b) ødelægger et luftfartøj i drift eller beskadiger det på en sådan måde, at det ikke kan flyve, eller dets sikkerhed må antages at blive bragt i fare under flyvning; eller
c) anbringer eller lader anbringe – uanset på hvilken måde – i et luftfartøj i drift en indretning eller et stof, der må antages at ødelægge luftfartøjet eller beskadige det på en sådan måde, at det ikke kan flyve, eller dets sikkerhed må antages at blive bragt i fare under flyvning; eller
d) ødelægger eller beskadiger luftfartshjælpemidler eller forstyrrer deres drift, dersom en sådan handling må antages at bringe et luftfartøjs sikkerhed i fare under flyvning; eller
e) giver oplysninger, som han ved er urigtige, og derved bringer et luftfartøjs sikkerhed i fare under flyvning.

1 *bis.* Enhver person gør sig skyldig i en forbrydelse, hvis han ulovligt og forsætligt ved hjælp af et redskab, et stof eller et våben:

a) foretager en voldshandling mod en person i en lufthavn, der betjener den internationale civile luftfart, som forårsager eller som må antages at forårsage alvorlig skade eller død; eller
b) ødelægger eller alvorligt beskadiger anlæg i en lufthavn, der betjener den internationale civile luftfart, eller luftfartøjer, som ikke er i drift og befinder sig i lufthavnen, eller afbryder lufthavnens drift, hvis en sådan handling bringer eller må antages at bringe sikkerheden i lufthavnen i fare.

2. En person gør sig ligeledes skyldig i en forbrydelse, hvis han

a) forsøger at begå nogen af de i stk. 1 eller stk. 1 *bis* nævnte forbrydelser; eller
b) medvirker til, at en anden begår eller forsøger at begå en sådan forbrydelse.”

3) Artikul II í millumtjóðasáttmála frá 14. desember 1973 um at fyribyrgja og revsa brotsverk ímóti altjóða vardum persónum, herímillum sendifólkum:

"*Artikel 2*

1. Følgende forsætlige handlinger
   a) manddrab, bortførelse eller andet angreb på en internationalt beskyttet persons legeme eller frihed;
   b) voldshandling mod en internationalt beskyttet persons tjenestested, privatbolig eller transportmiddel, som må antages at bringe hans person eller frihed i fare;
   c) trussel om at foretage et sådant angreb;
   d) forsøg på at foretage et sådant angreb; og
   e) medvirken til foretagelse af sådanne angreb skal gøres strafbare i henhold til hver af de deltagende staters nationale lovgivning.

2. Enhver deltagende stat skal fastsætte passende straffe for de nævnte forbrydelser under hensyntagen til deres alvorlige karakter.

3. Bestemmelserne i stk. 1 og 2 påvirker ikke de deltagende staters forpligtelser til i henhold til folkeretten at træffe alle egnede foranstaltninger til forebyggelse af andre angreb på en internationalt beskyttet persons legeme, frihed eller værdighed."

4) Artikul 1 í millumtjóðasáttmála frá 17. desember 1979 ímóti gíslatøku:

"*Artikel 1*

1. Enhver person, som tilfangetager eller tilbageholder en anden person og truer med at dræbe, legemsbeskadige eller fortsat at tilbageholde denne (i det følgende benævnt "gidslet") med henblik på at tvinge tredjepart, dvs. en stat, en international intergovernemental organisation, en fysisk eller juridisk person eller en gruppe personer til at foretage eller undlade at foretage nogen handling som en udtrykkelig eller stiltiende betingelse for frigivelsen af gidslet, begår den forbrydelse at tage gidsler ("gidseltagning") i denne konventions forstand.

2. Enhver person, som
   a) forsøger at foretage gidseltagning eller

3. medvirker til, at andre foretager eller forsøger at foretage gidseltagning, begår ligeledes en forbrydelse, som falder ind under denne konvention."

5) Artikul 7 í IAEA-sáttmálanum, Sáttmálin hjá The International Atomic Energy Agency, frá 3. mars 1980 um fysiska vernd av kjarnorkutilfari:

"*Artikel 7*

1. Det forhold, at der begås:
   a) en handling uden lovlig bemyndigelse, der indebærer modtagelse, besiddelse, brug, overdragelse, ændring, bortskaffelse eller spredning af nukleare materialer og som forvolder eller sandsynligvis vil forvolde død eller alvorlig overlast på nogen person eller betydelig tingsskade;
   b) et tyveri eller røveri af nukleare materialer;
   c) underslæb eller svigagtig tilegnelse af nukleare materialer;
   d) en handling, der indebærer et krav om nukleare materialer ved trusler eller brug af magt eller enhver anden form for tvang;

e) en trussel:
   i. om at anvende nukleare materialer til at forvolde død eller alvorlig overlast på nogen person eller betydelig tingsskade, eller
   ii. om at begå en forbrydelse som beskrevet i pkt. (b) for at tvinge en fysisk eller juridisk person, en international organisation eller en stat til at udføre eller afholde sig fra at udføre nogen handling;

f) et forsøg på at begå en forbrydelse som beskrevet i stk. (a), (b) eller (c); samt

g) en handling, som indebærer medvirken til en forbrydelse som beskrevet i stk. (a) til (f), skal af hver af deltagerstaterne behandles som en strafbar handling i medfør af statens nationale lovgivning.

2. Hver af deltagerstaterne skal gøre de i nærværende artikel beskrevne forbrydelser strafbare med passende sanktioner, der tager hensyn til handlingernes alvorlige natur."

6) Artikul 3 í millumtjóðasáttmála frá 10. mars 1988 um at basa ólógligum gerðum ímóti sjótrygdini:

"*Artikel 3*

1. En person gør sig skyldig i en forbrydelse, hvis han ulovligt og forsætligt
   a) tilbageholder eller udøver kontrol over et skib ved hjælp af magt eller trusler herom eller om enhver anden krænkelse; eller
   b) udøver en voldshandling om bord på et skib, hvis handlingen må antages at bringe skibets sikkerhed i fare under sejlads; eller
   c) ødelægger eller beskadiger et skib eller dets last, hvis handlingen må antages at bringe skibets sikkerhed i fare under sejlads; eller
   d) på et skib anbringer eller lader anbringe – uanset på hvilken måde – en indretning eller et stof, der må antages at ødelægge skibet eller beskadige skibet eller dets last, således at det må antages at bringe skibets sikkerhed i fare under sejlads; eller
   e) ødelægger eller alvorligt beskadiger navigations- og afmærkningssystemer til vejledning for skibsfarten eller alvorligt griber ind i deres drift, hvis en sådan handling må antages at bringe et skibs sikkerhed i fare under sejlads; eller
   f) videregiver oplysninger, han ved er usande, og derved bringer sikkerheden i fare for et skib under sejlads;
   g) sårer eller dræber en person i forbindelse med overtrædelse eller forsøg på overtrædelse af en af de i litra a) til f) omhandlede forbrydelser.

2. En person gør sig ligeledes skyldig i en forbrydelse, hvis han:
   a) forsøger at begå en af de i stk. 1 omhandlede forbrydelser; eller
   b) tilskynder til en af de i stk. 1 omhandlede forbrydelser, uanset af hvem den begås, eller på anden måde er i ledtog med en, der begår en sådan forbrydelse;
   c) for at foranledige en fysisk eller juridisk person til at foretage eller undlade nogen handling truer – med eller uden betingelser som fastsat i national lovgivning – med at begå en af de i stk. 1, litra b), c) og e) omhandlede forbrydelser, hvis en sådan trussel må antages at bringe sikkerheden for et skib i fare under sejlads."

7) Artikul 2 í ískoytissáttmálanum frá 10. mars 1988 um at basa ólógligum gerðum ímóti trygdini á fastfestum oljupallum á landgrunninum:

"*Artikel 2*

1. En person gør sig skyldig i en forbrydelse, hvis han ulovligt og forsætligt
   a) tilbageholder eller udøver kontrol over en fastgjort platform ved hjælp af magt eller trusler herom eller trusler om enhver anden krænkelse; eller
   b) udøver en voldshandling om bord på en fastgjort platform, hvis handlingen må antages at bringe dens sikkerhed i fare; eller
   c) ødelægger eller beskadiger en fastgjort platform, hvis handlingen må antages at bringe dens sikkerhed i fare; eller
   d) på en fastgjort platform anbringer eller lader anbringe – uanset på hvilken måde – en indretning eller et stof, der må antages at ødelægge den fastgjorte platform eller bringe dens sikkerhed i fare; eller
   e) sårer eller dræber en person i forbindelse med overtrædelse eller forsøg på overtrædelse af en af de i litra a) til d) omhandlede forbrydelser.

2. En person gør sig ligeledes skyldig i en forbrydelse, hvis han:
   a) forsøger at begå en af de i stk. 1 omhandlede forbrydelser; eller
   b) tilskynder til en af de i stk. 1 omhandlede forbrydelser, uanset af hvem den begås, eller på anden måde er i ledtog med en, der begår en sådan forbrydelse:
   c) for at foranledige en fysisk eller juridisk person til at foretage eller undlade nogen handling truer – med eller uden betingelser som fastsat i national lovgivning – med at begå en af de i stk. 1, litra b) og c) omhandlede forbrydelser, hvis en sådan trussel må antages at bringe sikkerheden for den fastgjorte platform i fare."

8) Artikul 2 í millumtjóðasáttmála frá 15. desember 1997 um at basa yvirgangsbumbing:

"*Artikel 2*

1. En person begår en forbrydelse i denne konventions forstand, hvis den pågældende ulovligt og forsætligt leverer, anbringer, affyrer eller detonerer en eksplosiv eller anden dødbringende anordning i eller på, ind i eller mod et offentligt sted, en stats- eller regeringsfacilitet, et offentligt transportsystem eller en infrastrukturfacilitet:
   a) med forsæt til at forårsage død eller alvorlig personskade; eller
   b) med forsæt til at forårsage omfattende ødelæggelse af stedet, faciliteten eller systemet, hvis ødelæggelsen medfører eller sandsynligvis vil medføre et større økonomisk tab.

2. En person begår ligeledes en forbrydelse, hvis den pågældende forsøger at begå en forbrydelse som anført i stk. 1.

3. En person begår ligeledes en forbrydelse, hvis den pågældende:
   a) medvirker til en forbrydelse som anført i stk. 1 eller 2; eller
   b) organiserer eller pålægger andre at begå en forbrydelse som anført i stk. 1 eller 2; eller
   c) på anden måde medvirker til, at en gruppe personer, der handler med et fælles formål, begår en eller flere forbrydelser som anført i stk. 1 eller 2. Denne medvirken skal være forsætlig og skal enten foretages i den hensigt at fremme gruppens generelle kriminelle virksomhed eller formål eller foretages med viden om, at gruppen har til hensigt at begå den eller de pågældende forbrydelser."

9) Artikul 2 í millumtjóðasáttmála frá 13. apríl 2005 um at basa kjarnorkuyvirgangi:

"*Artikel 2*

1. Enhver person begår en forbrydelse i denne konventions forstand, hvis den pågældende uberettiget og forsætligt:

a) er i besiddelse af radioaktivt materiale eller fremstiller eller er i besiddelse af en anordning:
   i. med forsæt til at forårsage død eller alvorlig personskade, eller
   ii. med forsæt til at forårsage betydelig tings- eller miljøskade.

b) på nogen måde anvender radioaktivt materiale eller en anordning eller anvender eller beskadiger et nukleart anlæg på en måde, som medfører eller risikerer at medføre udslip af radioaktivt materiale:
   i. med forsæt til at forårsage død eller alvorlig personskade, eller
   ii. med forsæt til at forårsage betydelig tings- eller miljøskade, eller
   iii. med forsæt til at tvinge en fysisk eller juridisk person, en international organisation eller en stat til at foretage eller undlade at foretage en handling.

2. En person begår ligeledes en forbrydelse, hvis den pågældende:

a) truer – under omstændigheder, der indikerer truslens troværdighed – med at begå en forbrydelse som anført i stk. 1 b), eller

b) uberettiget og forsætligt ved trussel – under omstændigheder, der indikerer truslens troværdighed – eller ved brug af magt fremsætter krav om radioaktivt materiale, en anordning eller et nukleart anlæg.

3. Enhver person begår ligeledes en forbrydelse, hvis den pågældende forsøger at begå en forbrydelse som anført i stk. 1.

4. Enhver person begår ligeledes en forbrydelse, hvis den pågældende:

a) medvirker til en forbrydelse som anført i stk. 1, 2 eller 3, eller

b) organiserer eller pålægger andre at begå en forbrydelse som anført i stk. 1, 2 eller 3, eller

c) på anden måde medvirker til, at en gruppe personer, der handler med et fælles formål, begår en eller flere forbrydelser som anført i stk. 1, 2 eller 3. En sådan medvirken skal være forsætlig og skal enten foretages i den hensigt at fremme gruppens generelle kriminelle virksomhed eller formål eller foretages med viden om, at gruppen har til hensigt at begå den eller de pågældende forbrydelser."

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Á heysti 2015 samtykti Løgtingið at heita á landsstýrið um at dagføra og føroyska revsilógina. Hetta er eitt stórt og rættiliga tíðarkrevjandi arbeiði, og dagføringin av revsilógini verður tí býtt sundur í hóskandi partar. Hetta ger tað samstundis møguligt hjá landsstýrinum og Løgtinginum at viðgera dagføringarnar betur og gjøllari bæði málsliga og innihaldsliga. Til nú eru kapitlarnir 14 til 19 og kapitlarnir 24 til og við 29 dagførdir og føroyskaðir.

Revsilógin er yvirskipað býtt í tveir partar. Ein almennan part, sum m.a. ásetur treytirnar fyri at revsa, og ein serligan part, sum inniheldur tey ítøkiligu brotini, sum verða revsað.

Í hesum umfarinum er tað hetta, ið verður dagført og føroyskað: kap. 12: Landasvik og onnur brotsverk ímóti sjálvsavgerðarrætti og trygd Føroya fólks o.a., kap. 13: Brotsverk ímóti stýrisskipanini og landsmyndugleikum føroyinga, kap. 20: Alvandasom brotsverk, kap. 21: Ymsar gerðir, sum eru til skaða fyri almenningin, kap. 22: Bidding og skaðiligt inntøkuvirksemi og kap. 23: Brotsverk í familjuni. Við hesum eru allir kapitlarnir í serliga partinum av revsilógini dagførdir og týddir til føroyskt.

Eftir ætlan skal arbeiðið at dagføra og føroyska revsilógina vera liðugt í 2021.

Arbeiðið at føroyska revsilógina verður gjørt í samstarvi við Málráðið, sum vegleiðir í málsligum ivamálum, og Revsirættarliga ráðið, sum í høvuðsheitum viðger løgfrøðiliga innihaldið og eisini í ávísan mun málið.

Harafturat er lógaruppskotið umrøtt við danska løgmálaráðið, sum hevur sagt sína hugsan um broytingarnar í kapitli 12: Landasvik og onnur brotsverk ímóti sjálvsavgerðarrætti og trygd Føroya fólks o.a. og í kapitli 13: Brotsverk ímóti stýrisskipanini og landsmyndugleikum føroyinga.

Ummælisfundir hava verið við Etiska Ráðið, Føroya Advokatfelag, Føroya Kommunufelag, Føroya Politistafelag, MEGD og Vinnuhúsið.

Dagførdur orðalisti við orðingum og hugtøkum, sum Málráðið hevur góðkent í sambandi við føroyskan av revsilógini, verður lagdur við sum fylgiskjal 2.

1.2. Galdandi lóggáva

Kapittul 12
Ásetingarnar í kapitli 12 viðvíkja í stóran mun álopum og hóttanum ímóti ytru trygdini hjá danska statinum. Tað er altíð danski løgmálaráðharrin, sum tekur avgerð um átalu sambært øllum ásetingunum í kapitli 12.
Tey brotsverk, ið verða lýst í bæði kapitli 12 og 13, eru í flestu førum av politiskum slag, og nevningaviðgerð er tí sum meginregla neyðug.
Orðingarnar í galdandi lóggávu eru merktar av, at revsilógin hevur verið danskt málsøki. Brotsverkini snúgva seg í stóran mun um danska statin og danskar myndugleikar.
Tá ið revsilóggávan varð yvirtikin, varð í viðmerkingunum til yvirtøkulógina gjørt greitt, at avgerð um átalu eftir kapitli 12 og 13 eigur at liggja hjá danska løgmálaráðharranum, tí atlit kunnu vera at taka til fremmandavald.

Í yvirtøkulógini er eisini lagt til grundar, at kapittul 12 og 13 í føroysku revsilógini ikki eiga at víkja grundleggjandi frá donsku lóggávuni. Í hesum liggur tó einki krav um, at lóggávan skal vera einsljóðandi.

Kapittul 13
Kapittul 13 er neyvt knýttur at kapitli 12. Kapittul 12 viðvíkur álopum og hóttanum ímóti ytru trygdini hjá danska statinum, og kapittul 13 viðvíkur álopum og hóttanum ímóti innaru trygdini og ímóti demokratisku samfelagsskipanini ella gerðum, sum tarna ella bróta niður virksemi hjá fólkastýrinum.
Danski løgmálaráðharrin tekur avgerð um átalu viðvíkjandi brotsverkunum, sum nevnd eru í §§ 111-115 og 118 í kapitli 13. Sí annars viðmerkingarnar til kapittul 12.

Kapittul 20
Hugtakið "almenfarlige forbrydelser (alvandasom brotsverk)" verður einans nýtt í kapitlaheitinum og ikki í einstøku ásetingunum í kapitli 20. At talan er um alvandasom brotsverk vísir, at gerðin kemur einari størri óásettari mongd av persónum ella góðsi í vanda og kann eftir umstøðunum hava týdning fyri tulkingina av einstøku ásetingunum.
Størsti parturin av ásetingunum í kapitli 20 eru óbroyttar síðan 1930. Har eru tó nýggjari ásetingar, sum t.d. § 183 a um flográn, § 191 viðvíkjandi álvarsligum brotum á lóggávuna um euforiserandi evni og § 192 a viðvíkjandi álvarsligum brotum á vápnalóggávuna og lóggávuna um spreingievni og spreingiarbeiði.

Kapittul 21
Kapittul 21 fevnir um ymiskar ásetingar, sum hava eitt ávíst tilknýti til kapittul 20, men sum ikki hava havt eitt natúrligt pláss aðrastaðni í revsilógini.

Kapittul 22
Ásetingarnar í kapitli 22 byggja í stóran mun á eldri lóggávu og á ta hugsan, at ein og hvør hevur skyldu at vinna sær til lívsins uppihald á lógligan hátt. Um viðkomandi ikki á hendan hátt kann vinna sær til lívsins uppihald, hevur hann skyldu at venda sær til almennar myndugleikar fyri á tann hátt at fáa ta hjálp, sum hann hevur krav um sambært grundlógini. Á hendan hátt verða áhugamál samfelagsins í ávísan mun vard ímóti, at borgarin kann vinna sær til lívsins uppihald á ein hátt, sum einki virði hevur fyri samfelagsbúskapin, ella sum beinleiðis er skaðiligur.

Kapittul 23
Í hesum kapitli eru revsiásetingar savnaðar, sum hava tað til felags, at tær hava tilknýti til viðurskifti í familjuni. Ásetingarnar eru annars ógvuliga ymiskar.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Ætlanin við hesum uppskotinum er at dagføra og føroyska kapittul 12 og 13 og kapittul 20–23 í revsilógini. Hesir kapitlar fevna um hesi brotsverk:

Kapittul 12: Landasvik og onnur brotsverk ímóti sjálvsavgerðarrætti og trygd Føroya fólks o.a.
Kapittul 13: Brotsverk ímóti stýrisskipan og landsmyndugleikum føroyinga yvirgangur o.a.
Kapittul 20: Alvandasom brotsverk
Kapittul 21: Ymsar gerðir, sum eru til skaða fyri almenningin
Kapittul 22: Bidding og skaðiligt inntøkuvirksemi
Kapittul 23: Brotsverk í familjuni

Í lógaruppskotinum eru tað í høvuðsheitum dagføringarnar í mun til galdandi rætt, ið verða gjøllari lýstar. Harumframt verður greitt frá málsligum valum og ivamálum.

Tá ið støða verður tikin til, hvørjar dagføringar skulu gerast í revsilógini, verður hugt at, hvørjar dagføringar eru gjørdar í donsku revsilógini, frá tí at revsirættarliga økið kom undir føroyskt málsræði í 2010. Hugt verður at endamálinum við donsku broytingini, og um tað hevur týdning og verður hildið neyðugt at fremja hesa dagføring í Føroyum.

Grundleggjandi eigur bert at lóggevast, tá ið tað er neyðugt. Hetta er í serligan mun galdandi á revsirættarliga økinum, tí í flestu førum er talan um tyngjandi inntriv mótvegis borgaranum. Tí mugu atlitini, sum tala fyri revsing, alla tíðina vigast upp ímóti inntrivinum í persónliga frælsið hjá borgarunum. Metast má um, hvørt inntrivið stendur mát við endamálið, sum ætlanin er at røkka við revsiásetingini.
Tað eigur tí eisini at vera gjølla umhugsað, áðrenn revsingin fyri ymisk brotsverk verður skerpað, tí tað er í flestu førum trupult at bakka aftur.
Týdningarmikið er at hava í huga, at føroyska samfelagið er øðrvísi enn tað danska. Føroyska samfelagið er nógv minni og gjøgnumskygdari og samfelagsgongdin hevur ikki verið tann sama sum í Danmark. Hetta eigur at endurspeglast í føroysku lóggávuni, samstundis sum lóggávan er grundað á ta norðurlendsku revsirættarsiðvenjuna.

Kapittul 12 og 13 viðvíkja landasviki og yvirgangi, tað vil siga brotsverk av politiskum slag. Í galdandi lóggávu eru hesar ásetingar merktar av, at lóggávan hevur verið undir donskum málsræði. Ásetingarnar viðvíkja tí í stóran mun brotsverkum ímóti danska statinum og donskum myndugleikum, og brotsverk ímóti Føroyum og føroyskum myndugleikum verða ikki nevnd beinleiðis, tó at tey eru fevnd av ásetingunum.

Av tí at revsilóggávan nú er á føroyskum hondum, hevur ætlanin verið at gjørt greitt, at kapittul 12 og 13 í serligan mun viðvíkja brotsverkum ímóti Føroyum og føroyskum myndugleikum. Brotsverk ímóti danska statinum og donskum myndugleikum verða tó framhaldandi fevnd av hesum kapitlum, herundir brotsverk ímóti kongi, Fólkatingi og Hægstarætti.
Í sambandi við dagføring av hesum kapitlum hevur tað eisini stóran týdning, at føroyska lóggávan ikki grundleggjandi víkur frá donsku lóggávuni, sbrt. viðmerkingunum omanfyri um yvirtøkulógina.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Málið

Ætlanin við uppskotinum er í fyrstu syftu at føroyska revsilógina. Yvirskipað hevur tað frá byrjan, tá ið gongd varð sett á arbeiðið at dagføra og føroyska revsilógina, verið ætlanin at royna at nýta eitt mál, sum er lætt at skilja hjá vanliga borgaranum. Tað hevur tó sera stóran týdning, at lógin er nóg neyv. Talan er um ásetingar, sum áleggja borgaranum tyngjandi inntriv og revsing, og atlitið til rættartrygdina vigar tí altíð mest. Tað er sera týdningarmikið, at eingin ivi er um, hvat ið er ásett í lógini.
Føroyska og danska málið eru tó rættiliga ymisk, og tað kann tí vera torført at týða orð fyri orð. Við hvørt er einki føroyskt orð, sum fevnir um júst tað sama sum danska orðingin. Tá kann vera neyðugt at nýta serføroyskar orðingar í staðin. Eitt dømi um hetta er danska orðið "økonomiske midler", sum vit einki beinleiðis orð hava fyri á føroyskum. "Midler" er eitt víðari hugtak enn "fígging", so loysnin bleiv at knýta orðið "fígging" saman við orðingin "og onnur ráð" fyri at vísa, at talan er um eitt víðari hugtak enn bert "fígging".

Ein annar trupulleiki við at leggja seg ov nær donsku orðingunum er, at málið verður konstruerað og ringt at skilja. Tað er tí neyðugt alla tíðina at royna at finna javnvágina ímillum eitt lætt og skilligt føroyskt mál og neyvleikan í lógarmálinum.

Føroyska revsirættarmálið er í eini menningarfasu, og tað hevur tí stóran týdning, at tað sleppur at mennast, uttan at formalistisku karmarnir blíva ov trongir. Føroyskt mál brúkar í størri mun aktivar setningar og sagnorð heldur enn passivar setningar og navnorð. Revsirættarmálið verður tí óneyðuga tungt og torført at skilja, um umsetingin í ov stóran mun verður merkt av navnorðamáli og orð fyri orð umseting.
Danska revsirættarmálið hevur ment seg gjøgnum nøkur hundrað ár gjøgnum praksis og siðvenju og er framvegis í støðugari menning. Málið stendur sostatt ikki í stað og er ikki tað sama í eldru ásetingunum sum í teimum nýggjaru.

Revsirættarøkið er føroyskt málsøki, og føroyskt revsirættarmál má tí sleppa at menna seg innan fyri føroysku karmarnar. Føroya Rættur hevur ein týdningarmiklan leiklut í at menna føroyska lógarmálið gjøgnum rættarpraksis.

Í innleiðingini til serligu viðmerkingarnar verður víst á, at tað ikki er ætlanin, at føroyski teksturin innihaldsliga skal víkja frá danska tekstinum uttan í teimum førum, har føroysk viðurskifti hava gjørt, at onkrar ásetingar í danska tekstinum ikki eru tiknar við ella eru tillaðagar. Í hesum førum verður tað greitt tilskilað í serligu viðmerkingunum.
Stór orka er eisini løgd í at fáa Málráðið at góðkenna ymiskar orðingar, sum síðan eru settar á ein lista við góðkendum orðingum. Harumframt verður gjølla greitt frá í serligu viðmerkingunum til hvørja grein, hvussu ymiskar danskar orðingar eru umsettar til føroyskt.

Innihaldið
Kapitlarnir 12 og 13 viðvíkja ávikavist ytru og innaru trygdini í landinum. Av tí at revsilógin nú er føroyskt málsøki, eigur lógarteksturin at spegla hetta. “Danski staturin og danskir myndugleikar” eru tí sum heild broyttir til “Føroyar og føroyskar myndugleikar”. Ein áseting verður tó innsett um, at brotsverk ímóti danska statinum og donskum myndugleikum, herundir kongi, Fólkatingi og Hægstarætti, verða revsað á sama hátt.
At lógarteksturin nú verður fluttur yvir á føroysk viðurskifti ávirkar eisini í ávísan mun valið av orðingum. Heitið á kapitli 12 í donsku revsilógini er: “Landsforræderi og andre forbrydelser mod statens selvstændighed og sikkerhed”. Heitið endurspeglar, at Danmark er sjálvstøðugt ríki. Føroyar eru ikki sjálvstøðugt ríki, men hava ræði á teimum málsøkjum, sum eru yvirtikin, og hava eina stjórn og eitt Løgting, sum taka avgerðir vegna Føroya fólk. Kapittul 12 verjir hesar skipanir ímóti hóttanum uttaneftir, sum til dømis royndir at leggja Føroyar undir fremmant vald ella at koma Føroyum út í kríggj ella herseting.

Heitið á kapitli 13 í donsku revsilógini er: “Forbrydelser mod statsforfatningen og de øverste statsmyndigheder, terrorisme m.v.” Hetta er av somu grundum sum omanfyri nevnt týtt til: “Brotsverk ímóti stýrisskipan og landsmyndugleikum føroyinga, yvirgangur o.a.

Grundleggjandi verður hildið fast í, at føroyska lóggávan ikki víkur ov nógv frá donsku lóggávuni á hesum øki.
Hildið verður fast í, at viðvíkjandi avgerð um átalu eftir kapitli 12 er tað altíð løgmálaráðharrin, sum tekur hana, og somuleiðis í flestu førum eftir kapitli 13. Hetta samsvarar við viðmerkingarnar til yvirtøkulógina.

Í donsku revsilógini er ein nýggj áseting sett í § 101 a í kapitli 12, sum viðvíkur persóni, sum í vápnaðum stríði við danska statin umboðar eitt vápnað lið, sum stríðist ímóti danska statinum. Ásetingin viðvíkur persónum, sum hava danskan heimarætt ella bústað í danska statinum.

Somuleiðis er ein nýggj áseting sett í § 114 j í kapitli 13 í donsku revsilógini. Ásetingin setur forboð fyri ferð inn á og uppihald í ávísum øki, har vápnað stríð er, uttan loyvi frá danska løgmálaráðharranum.

Hesar ásetingar eru ikki tiknar við í føroysku revsilógina í hesum umfari. Ætlanin er tó saman við danska løgmálaráðnum at kanna, hvussu slepst undan, at revsirættarlig tómrúm koma í millum Føroyar og Danmark, tá ið tað viðvíkur ytru og innaru trygdini í ríkinum.

Tá ið arbeiðið at føroyska revsilógina byrjaði, varð samstundis farið undir at gera orðalista við nýggjum orðum og hugtøkum úr lógini. Ætlanin er at halda á at dagføra orðalistan við orðum, sum Málráðið góðkennir í sambandi við hetta lógaruppskotið.

Umframt at føroyska revsilógina er eisini gjørt uppskot til neyðugar dagføringar av lógini.

Kapittul 12
Allastaðni í kapitli 12 verður "danski staturin og danskir myndugleikar" broytt til "Føroyar og føroyskar myndugleikar". Við hesum verður dentur lagdur á, at í Føroyum eru tað fyrst og fremst brotsverk ímóti Føroyum og føroyskum myndugleikum, ið verða revsað. Harumframt gongur fram av nýggju ásetingini í § 110 g, at brotsverk ímóti danska statinum og donskum myndugleikum, herundir kongi, Fólkatingi og Hægstarætti, verða revsað á sama hátt.

Hesar broytingar kunnu serliga verða tiknar fram:

Skotið verður upp, at **heitið** verður broytt frá: "Forbrydelser mod statens selvstændighed og sikkerhed" til "Landasvik og onnur brotsverk ímóti sjálvsavgerðarrætti og trygd Føroya fólks o.a." Við hesi broyting verður dentur lagdur á, at álvarsligastu brotsverkini í kapitli 12 mugu metast at vera landasvik. Hetta er í samsvari við broytingina í heitinum á kapitli 12 í donsku revsilógini, har "landsforræderi" eisini er blivið partur av heitinum.

§ 110 a, stk. 1, nr. 1 viðvíkur revsing fyri uttan neyðugt loyvi at greiða frá, taka mynd av ella á annan hátt at avmynda hernaðarligar verjustøðir, goymslur, deildir, vápn, útgerð ella tílíkt hjá ríkinum, sum ikki er almannaatgongt. Ásetingin viðvíkur eisini revsing til tann, sum margfaldar ella almannakunnger tílíkar frágreiðingar ella myndir. **§ 110 a, stk. 1, nr. 2** viðvíkur almannakunngerð av avgerðum, sum snúgva seg um herbúgving til stríð o.a. hjá ríkinum. **§ 110 a, stk. 2** ásetur, at tann, sum tilætlað ella av ósketni uttan neyðugt loyvi avmyndar danskt ríkisumráði úr loftfari, ella sum almannakunnger slíkar myndir, ið tiknar eru á ólógligan hátt, kann revsast við sekt. Í Danmark eru reglur viðvíkjandi at taka vinnuligar myndir úr loftfari, annars krevst ikki loyvi at at taka myndir av donskum ríkisumráði. Av tí at eingin lóggáva er í Føroyum viðvíkjandi at taka vinnuligar myndir úr loftfari, verður skotið upp, at stk. 2 verður strikað.

Í **§ 110 e** verður skotið upp at strika flaggið hjá Evropasamveldinum. Orsøkin er tann, at Føroyar ikki eru limur í Evropasamveldinum, og mett verður, at ikki er rætt at draga hetta flaggið fram um onnur fløgg. Ætlanin er tó framvegis, at flaggið hjá Evropasamveldinum skal verða vart av tí vanliga forboðnum ímóti at háða fløgg.

Í **§ 110 g** verður ein nýggj áseting sett inn, har gerðir, sambært §§ 98–110 a, mótvegis danska statinum ella myndugleikum tess, herundir kongi, Fólkatingi og Hægstarætti, verða revsaðar á sama hátt sum gerðir mótvegis Føroyum ella føroyskum myndugleikum.

Kapittul 13
Allastaðni í kapitli 13 verður "statsforfatningen og de øverste statsmyndigheder" broytt til: "Stýrisskipan og landsmyndugleikar føroyinga". Hetta ber eisini við sær, at tá ið danskir stovnar og myndugleikar verða nevndir, verður hetta broytt til samsvarandi føroyskar stovnar og myndugleikar. Við hesum verður dentur lagdur á, at í Føroyum eru tað fyrst og fremst brotsverk ímóti stýrislagnum í Føroyum og ovasta myndugleika føroyinga, ið verða revsað. Tað gongur tó fram av tí nýggju ásetingini í § 118 b, at brotsverk ímóti danska statinum og donskum myndugleikum, herundir kongi, Fólkatingi og Hægstarætti, framhaldandi verða revsað á sama hátt sum brotsverk ímóti føroyskum myndugleikum.

Heitið á kapitli 13 verður orðað í samsvari við broytingarnar, ið eru gjørdar í kapitli 13.

Í **§ 114 a, nr. 7** verður skotið upp at seta nýggja áseting inn. Broytingin ger, at føroysk lóggáva viðvíkjandi kjarnorkuyvirgangi verður í samsvari við sáttmálan hjá Evroparáðnum um at forða fyri yvirgangi og ST-sáttmálan um at basa kjarnorkuyvirgangi. Hóast Føroyar ikki hava bundið seg at hesum sáttmálum, og hóast lóggávan kanska ikki er so umráðandi í Føroyum, so verður mett, at føroysk lóggáva eigur at fylgja evropeiskari lóggávu viðvíkjandi yvirgangi.

§ 114 c, stk. 1 víðvíkur útvegan av persóni til at fremja ella stuðla undir yvirgang ella yvirgangslíknandi gerðir sambært §§ 114 og 114 a. Eftir § 114 c, stk. 3 kann tann, sum tekur við boði at fremja gerðir, ið fevndar eru av §§ 114 og 114 a, revsast við fongsli í upp til 6 ár. Skotið verður upp at broyta **§ 114 c, stk. 3,** so at revsingin fyri brot á ásetingina kann vaksa til fongsul upp í 10 ár, um viðkomandi er við í einum vápnaðum liði, ella undir serliga skerpandi umstøðum til fongsul upp í 16 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna slíkar, har viðkomandi hevur verið við í bardaga.
Yvirgangsfelagsskapir, sum við vápnaðum liði luttaka í vápnaðum bardøgum, eru størri hóttan ímóti samfelagnum, teir virka í, enn aðrir yvirgangsfelagsskapir. Tílíkir felagsskapir hava førleika at fremja yvirgangsvirksemi í nógv størri mun, enn vitað er um fyrr, og kunnu við vápnaðum liði fremja valdsgerðir og soleiðis taka sær vald í einum øki.

Persónar, sum hava verið í vápnaðum bardaga fyri yvirgangsfelagsskapir, kunnu eisini vera ein hóttan fyri tað samfelag, teir venda aftur til.
Grundað á hetta verður mett, at tað eigur at setast inn skerpað revsiramma fyri persónar, sum fara upp í vápnað lið, og serstakliga um teir hava verið við í bardaga.

Av somu grundum verður skotið upp at broyta **§ 114 e**, sum viðvíkur persónum, sum aðramáta stuðla persóni, bólki ella samskipan, sum fremur ella ætlar at fremja gerð, ið er fevnd av §§ 114, 114 a, 114 b, 114 c ella 114 d, so at revsing fyri brot á ásetingina kann vaksa til fongsul upp í 10 ár, um viðkomandi er við í einum vápnaðum liði, ella undir serliga skerpandi umstøðum til fongsul upp í 16 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna slíkar, har viðkomandi hevur verið við í bardaga.

Í **§ 114 h** verður skotið upp at seta inn nýggja áseting, sum ger tað revsivert at taka ímóti peningaligum stuðli ella veitingum frá einum yvirgangsfelagsskapi at brúka til at skipa ella reka stovn ella fyritøku ella til líknandi endamál her á landi.

Endamálið við ásetingini er at mótvirka teirri vælvild, tí valdi og tí møguleika fyri ávirkan, sum ein yvirgangsfelagsskapur kundi fingið við at stuðla t.d. vælgerandi endamálum.

Tað verður skotið upp at seta eina nýggja **§ 118 b** inn, sum ásetur, at brot framd á tær í §§ 111–116 nevndu gerðir mótvegis danska statinum ella myndugleikum tess, herundir kongi, Fólkatingi og Hægstarætti, verða revsað á sama hátt sum brotsverk ímóti føroyskum myndugleikum.
Somuleiðis er innsett ein skerping av revsingini fyri brotsverk ímóti kongi í teimum førum, har treytirnar fyri at revsa eftir §§ 112 og 113 ikki eru til staðar, umframt ein skerping av revsingini fyri brotsverk ímóti drotning, einkjudrotning og trónuarvinga.

Kapittul 20
Skotið verður upp at seta eina nýggja **§ 191 a** inn í kapittul 20, sum skerpir revsingina fyri brot á løgtingslóg um forboð móti ávísum dopingarevnum, um talan er um álvarsom brot á lóggávuna.
Doping hevur við sær álvarslig árin á heilsuna, og nýtsla av dopingevnum kann geva álvarsligar skaðar og í ringasta føri elva til deyða. Talan er tí um sera álvarslig brotsverk.
Tí verður mett, at álvarsom brot á løgtingslóg móti ávísum dopingarevnum eiga at kunna revsast við fongsli upp til 6 ár. Revsingin fyri brot á serlóggávuna er annars fongsul upp til 2 ár.
Ein revsiramma við fongsli upp til 6 ár gevur løgregluni møguleika at nýta fleiri tvingsilsinntriv eftir rættargangslógini, t.d. telefonavlurting, í sambandi við eftirkanning av álvarsligum dopingmáli.
Við hesari lógarbroyting verður revsingin fyri álvarslig brot á dopinglóggávuna á hædd við revsingina í Danmark, Svøríki og Noregi.

Kapittul 22
Skotið verður upp at varðveita **§ 199**, sum millum annað viðvíkur prostitutión, tó so at stuðul frá kvinnum, sum arbeiða sum prostitueraðar, verður broytt til: “stuðul frá persónum, sum arbeiða sum prostituerað”, tað merkir, at ásetingin verður gjørd kynsóheft, og at stuðul frá monnum, sum arbeiða sum prostitueraðir, tí eisini verður fevnt av ásetingini.

Aðrar broytingar
Skotið verður upp at gera nakrar málsligar tillagingar aðrastaðni í revsilógini, so at hesar orðingar samsvara við orðingar í hesum uppskoti. Talan er til dømis um orðingina “reglulig og skipað brotsverk”, sum verður broytt til: “brot av regluligum ella skipaðum slag”, um donsku orðingina “besidde”, sum ikki er týdd eins allastaðni, men sum nú verður broytt til “at hava um hendi”. Somuleiðis eru donsku orðingarnar “nærliggende fare” og “overhængende fare” týddar til ávikavist: “nærliggjandi vandi” og “hóttandi vandi”.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til ummælis í tveimum umførum hjá hesum pørtum: Føroya Rætti, Føroya Landfúta, Kriminalforsorgini, Fróðskaparsetri Føroya, Føroya Advokatfelag, Uttanríkis- og mentamálaráðnum, Fiskimálaráðnum (tilbúgving), Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Almannamálaráðnum (brotsverk í familjuni), Heilsumálaráðnum, Føroya Kommunufelag, Føroya Politistafelag, MEGD, Amnesty International Føroyar, Etiska Ráðnum og Vinnuhúsinum.

Lógaruppskotið er eisini lagt alment út á heimasíðuna hjá Løgmansskrivstovuni.

Harafturat hava verið hildnir ummælisfundir við Etiska Ráðið, Føroya Advokatfelag, Føroya Politistafelag, MEGD, Føroya Kommunufelag og Vinnuhúsið.

Uppskotið er eisini lagt fyri Revsirættarliga Ráðið á tveimum fundum, tann 24. januar 2020 og tann 3. februar 2020, umframt at danska løgmálaráðið hevur viðgjørt uppskotið til kapittul 12 og 13.

Hesi hava sent ummælisskriv: Føroya Rættur, Fíggjarmálaráðið, Fiskimálaráðið, Umhvørvis- og vinnumálaráðið, Almannamálaráðið, Heilsumálaráðið, Uttanríkis- og mentamálaráðið, Føroya Kommunufelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag, MEGD og Sinnisbati.

Fíggjarmálaráðið, Umhvørvis- og vinnumálaráðið, Almannamálaráðið, Heilsumálaráðið, **Uttanríkis- og mentamálaráðið** og **Føroya Kommunufelag** hava ongar viðmerkingar til lógaruppskotið.

Føroya Rættur vísir fyrst til upprit, sum Føroya Rættur gjørdi til fundin í Revsirættarliga Ráðnum tann 24. januar, har fleiri málsligar viðmerkingar vóru, umframt viðmerkingar til tillagingina í kap. 12 og 13 til føroysk viðurskifti. Føroya Rættur hevur eisini gjørt nakrar málsligar viðmerkingar í øðrum ummælisumfari, umframt viðmerking til §§ 110 g og 118 b.

So at siga allar málsligar viðmerkingar frá Føroya Rætti eru tiknar til eftirtektar. Føroya Rættur hevur viðmerkt til § 187, stk. 1, nr. 3 og til § 188, stk. 1, at "við at dylja" ikki sigur tað sama sum "med fortielse af" og skjýtur upp heldur at nýta "í tøgn um". Mett verður, at sagnorðið "dylja" er meira aktivt enn "tiga" og svarar tí betur til orðingina "fortie", sum sambært Den Danske Ordbog merkir "med vilje undlade at omtale; holde skjult eller hemmelig". Fyri betri at samsvara við danska tekstin, er sagnorðið í hesum føri broytt til navnorð: "við dyljing".

Viðvíkjandi viðmerkingunum til §§ 110 g og 118 b er at siga, at orðingin "á sama hátt" er púra vanlig bæði í donsku og føroysku revsilógini, samstundis sum víst verður til hvørjar ásetingar og gerðir talan er um. Hetta er eisini tað, ið verður gjørt í §§ 110 g og 118 b.
§ 118 b er orðað soleiðis, at eingin ivi skal vera um, at kongur, Fólkating og Hægstirættur eru fevnd av ásetingini. Somuleiðis er nágreinað í § 118 b, stk. 2 og 3, at skerpilsini viðvíkjandi brotsverki ímóti kongi, drotning, einkjudrotning og trónuarvinga eisini eru fevnd. Hóast kap. 12 viðvíkur ytru trygdini í landinum, er § 110 g orðað soleiðis, at víst eisini verður til kong, Fólkating og Hægstarætt, soleiðis at eingin ivi skal verða um, at hesi eisini eru fevnd av ásetingini.

Annars skal verða víst á, at broytingarnar í kap. 12 og 13 eru viðgjørdar saman við danska løgmálaráðnum, sum hevur mett, at broytingarnar eru skynsamar, og at uppskotið kann verða lagt fyri Løgtingið so, sum tað nú er orðað.
Avtala er eisini gjørd við danska løgmálaráðið um saman at kanna føroysku og grønlendsku revsilógina at tryggja, at tað ikki eru týðandi rættarleys hol millum Danmark, Føroyar og Grønland.

At týða lógartekst er ein serlig grein innan fyri økið "teksttýðing". Løgfrøðiligir tekstir hava onga einstaka avtalaða merking, sum er óheft av samanhangingum, men draga týdning frá einari serstakari løgfrøðiligari skipan, siðvenju og felags hugsanarhátti.

Í løgfrøðiligum samskifti er munur á persóninum, sum verður ávirkaður av lóggávuni, og teimum, sum tulka og nýta lóggávuna. At týða løgfrøðiligar tekstir er í høvuðsheitum samskifti millum serfrøðingar, og úrslitið verður mált eftir, hvussu serfrøðingarnir tulka og nýta løgfrøðiliga tekstin, og um hetta er í samsvari við upprunaliga endamálið. Hóast fullkomið samskifti er endamálið við týðingini, eru serfrøðingar á einum máli um, at tað sera sjáldan, um nakrantíð, verður rokkið.

Dómstólarnir hava tí stóra ávirkan á, hvussu lógartekstir verða tulkaðar. Føroyska revsirættarmálið er spildurnýtt, og nú revsirættarøkið er blivið føroyskt málsøki, er umráðandi, at tað sleppur at mennast, uttan at formalistisku karmarnir gerast ov trongir. Føroya Rættur hevur í hesum sambandi ein týdningarmiklan leiklut í at menna føroyska lógarmálið gjøgnum rættarsiðvenju.

Annars kann yvirskipað sigast, at arbeiðið við at føroyska og dagføra revsilógina er gjørt sum ein 5 ára verkætlan, har hóskandi partar verða lagdir fyri tingið hvørt ár. Hetta ger tað møguligt hjá landsstýrinum og Løgtinginum at viðgera dagføringarnar betur og gjøllari bæði málsliga og innihaldsliga. Eftir ætlan skal revsilógin vera liðugt føroyskað og dagførd í 2021.

Upplýst kann verða, at ein týðari við innliti bæði í mál og løgfrøði hevur týtt tekstin. Síðan fara løgfrøðingarnir á lógartænastuni gjøgnum uppskotið fleiri ferðir, har spurningar um málslig ivamál verða send Málráðnum at taka støðu til. At lógaruppskotið verður gjøgnumgingið so ofta, er júst fyri at tryggja, at tað verður so neyvt sum til ber.
Tá ið støða verður tikin til, hvørjar dagføringar skulu gerast í revsilógini, verður hugt at, hvørjar dagføringar eru gjørdar í donsku revsilógina, frá tí at revsirættarliga økið kom undir føroyskt málsræði í 2010. Hugt verður at endamálinum við donsku broytingini, og um tað hevur týdning og neyðugt verður hildið at fáa hesa dagføring í Føroyum.
Grundleggjandi eigur bert at lóggevast, tá ið tað er neyðugt. Hetta er serliga galdandi á revsirættarliga økinum, tí í flestu førum er talan um tyngjandi inntriv mótvegis borgaranum. Tí mugu atlitini, sum tala fyri revsing, støðugt verða vigað upp ímóti inntrivinum í persónliga frælsið hjá borgarunum, serliga í einum lítlum samfelag sum tí føroyska, sum ikki hevur havt somu samfelagsgongd sum eitt nú Danmark.

Í samráð við Revsirættarliga ráðið varð avgerð tikin um, at í høvuðsheitum eru tað dagføringarnar, ið skulu verða lýstar gjøllari í viðmerkingunum. Hetta fyri at ivi ikki skal vera um, um ætlan er at broyta tekstliga innihaldið.
Greitt verður tó eisini frá málsligum valum og ivamálum.

Mett verður, at tað hevur stóran týdning, at revsilógin er á føroyskum, nú málsøkið er á føroyskum hondum, og at lóggávan verður lagað til føroysk viðurskifti.

Tað hevur í størst møguligan mun verið roynt at tryggja, at revsilógin málsliga er nóg neyvt orðað millum annað við at senda uppskotið víða út til ummælis, við at hava ummælisfundir við týðandi partar og við at samskifta við Málráðið um málslig ivamál.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ongar viðmerkingar til uppskotið, men heitir á Løgmans-skrivstovuna um at skipa fyri kunning eisini fyri vinnuna um tær broytingar, hetta uppskotið hevur við sær viðvíkjandi tí at reka vinnuvirksemi, tá ið komið er á mál við at dagføra revsilógina.

Hetta fer Løgmansskrivstovan at hava í huga.

Væntandi verður arbeiðið við at dagføra og føroyska revsilógina liðugt í seinnu helvt av 2021. Tá verður umhugsað at skipa fyri eini ráðstevnu, har viðgjørt verður, hvar eitt samfelag sum tað føroyska eigur at leggja seg revsirættarliga. Á eini tílíkari ráðstevnu kundi verið áhugavert at hoyrt nakað um samspælið millum revsilóg og vinnu.

Fiskimálaráðið heldur, at tað er ov tíðarkrevjandi at gera viðmerkingar til allar lógargreinarnar. Tó verður mælt til at tryggja, at føroyska týðingin fær júst sama innihaldsliga týdning sum revsirættarlig hugtøk í donsku lógini. Somuleiðis verður gjørt vart við, at tað er umráðandi, at orðingar eru greiðar, tí talan er um revsirætt, og at tað framgongur av EMRS, art. 7, at heimild at revsa er ásett í greiðari revsireglu.

Til hetta er at siga, at Løgmansstovan leggur stóra orku í at fáa ásetingarnar so neyvar, sum til ber. Tað kann tó vera trupult at fáa sama innihaldsliga týdningin, sum donsk revsirættarlig hugtøk hava, tí málið er ikki tað sama. Fyri at tryggja, at innihaldsligi týdningurin ikki broytist, verður roynt at greiða frá, hvussu ymisk hugtøk eru týdd, og í innganginum til serligu viðmerkingarnar, umframt fleiri støð í einstøku viðmerkingunum, verður gjørt vart við, at ætlanin er ikki at broyta innihaldsliga týdningin uttan í teimum førum, har tað týðiliga skilst.
Somuleiðis er gjørdur ein revsirættarligur orðalisti, har orð, sum Málráðið hevur góðkent, verða sett á. Orðalistin verður dagførdur so hvørt og lagdur við uppskotinum sum fylgiskjal.

Fiskimálaráðið hevur gjørt almennar viðmerkingar til §§ 180–182. Hesar viðmerkingar eru allar tiknar til eftirtektar uttan í einum føri. Tað er viðmerkingin viðvíkjandi donsku orðingini "ildsvåde", sum kemur fyri í § 182. Fiskimálaráðið metir týdningin vera "vandi fyri eldsbruna" heldur enn "eldsbruni". Til hetta er at siga, at ásetingin er frá 1866, og at týdningurin av orðingin "ildsvåde" tá var "eldbruni". Hetta skilst bæði av donskum orðabókum og av viðmerkingum til greinina í "*Kommenteret straffelov, speciel del*".

MEGD
Megd tekur undir við, at revsilógin verður dagførd og føroyskað. Tey vísa á, at nógvar av støðunum, sum eru nevndar í revsilógini, so sum vápnað stríð, eru fremmandar fyri føroyingar. Megd vil tó vísa á týdningin, at um slík støða kemur í, so eiga Føroyar í samsvari við grein 11 í ST-sáttmálanum at tryggja fólki, ið ber brek, verju og trygd, tá ið tey eru stødd í vanda, eisini í vápnaðari ósemju, neyðstøðu í krígstíð, og tá ið náttúruvanlukkur henda. Løgmansskrivstovan tekur undir við sjónarmiðnum hjá MEGD. Spurningurin um trygd og verju er tó knýttur at tilbúgvingarætlan og samskipan, sum er eitt øki, sum Fiskimálaráðið varðar av.

Í sambandi við val vísir MEGD á týdningin av, at fólk við breki sjálvstøðugt kunnu greiða atkvøðu á valstaðnum ella við brævatkvøðu, so at forðað kann verða fyri, at atkvøðan virkar øðrvísi enn ætlað (§ 117, nr. 3). Tað merkir, at atkoma er fyri øll, sama um brekið viðvíkur sjón, hoyrn, lesiførleikum, flytføri ella øðrum.
Løgmansskrivstovan er samd við MEGD um, at fólk, ið bera brek, ið mugu hava hjálp at atkvøða, eru í eini sárbarari støðu, og at tað hevur týdning í størst møguligan mun at menna møguleikar fyri sjálvstøðugt at greiða atkvøðu á valstaðnum ella við brævatkvøðu.

MEGD viðmerkir viðvíkjandi § 189, at teimum er ikki greitt, hvørji fyribyrgingarevni talan er um.
Til hetta kann verða sagt, at ásetingin viðvíkur sviki við heilivági, tað merkir, at roynt verður at seta evni til sølu sum heilivág, sum ikki eru tað. Mett verður tí ikki, at hendan áseting hevur týdning fyri tann bólk, sum MEGD umboðar.

MEGD ger eisini viðmerkingar til § 191, sum viðvíkur euforiserandi evnum. Ritalin, sum verður nýtt til viðgerð til fólk við ADHD, er á listanum við euforiserandi evnum.
MEGD umboðar ein bólk av fólki við breki, sum vegna likamlig, sálarlig, vitborin og/ella kenslulig brek eru viðkvom og kunnu taka óumhugsaðar avgerðir og sum tey, ið vilja bróta lógina við at selja ólóglig evni, lættliga kunnu brúka.
MEGD metir, at um ein persónur í óumhugsni "avhendir mongum" slík evni, eru 10 ár í fongsli ein ógvuliga stórur partur av einum ungdómslívi. Hartil er spurningurin, hvussu nógv "mong" er.
Her er alneyðugt, at tann ungi við ADHD, sum fær viðgerð við ritalin, verður væl kunnaður um viðgerðina og avleiðingar av misbrúki. Og at hann fær í boði sálarfrøðiliga viðgerð aftur at heilivágnum, sum ger persónin føran fyri at megna gerandisdagin.
MEGD vil vísa á ásetingar í ST-sáttmálanum, at um fólk, sum bera brek, gera seg sek í sølu av euforiserandi og dopingevnum, so eiga tey at fáa javnbjóðis og munagóða lógarverju ímóti mismuni, sama hvør grundin er, og øll hóskandi stig eiga at verða tikin at tryggja, at rímiligar tillagingar verða gjørdar (stk 3). MEGD vil vísa á týdningin, at borgarar, ið hava avbjóðingar á ein hvønn hátt, fáa hóskandi viðferð, og at viðkomandi fakfólk verða boðsend, so tey í tilgongdini verða sædd, hoyrd og vird.
MEGD heldur eisini, at tað eigur at verða umhugsað, hvørjar avleiðingarnar eitt fongsulsuppihald kann hava aftur ímóti møguligum viðgerðartilboði.
MEGD vísir harafturat á grein 13 í ST-sáttmálanum. Atgongd til rættarskipanina: Stk. 2: Til tess at tryggja fólki, ið bera brek, at tey fáa brúkt rættarskipanina, skulu limalondini virka fyri, at tey, sum arbeiða í rættarfyrisitingini, harímillum løgregla og fongsulsstarvsfólk, fáa hóskandi uppvenjing í tí.

Løgmansskrivstovan tekur undir við sjónarmiðunum hjá MEGD, men vil samstundis gera vart við, at revsilógin snýr seg um, hvussu ymiskar brotsgerðir skulu revsast.

§ 191 í revsilógini viðvíkur skerpandi revsing, um talan er um serliga grov brot á lóggávuna um euforiserandi evni. Flestu brot eru ikki serliga grov og verða tí viðgjørd sambært vanligu lóggávuni um euforiserandi evni**.**

Í almenna partinum í revsilógini eru ásetingar um, nær umstøður kunnu metast sum linnandi, umframt ásetingar um aðrar rættarligar fylgjur av revsiverdari gerð, t.d. psykiatriskan viðgerðardóm og avvenjingarviðgerð.

Uppvenjing av løgreglu og fongsulsstarvsfólki umframt tilboð til fólk við t.d. ADHD eigur møguliga at verða tikið upp í sambandi við dagføringar av revsifulnaðarlógini (straffuld-byrdelsesloven).

Sinnisbati tekur undir við, at revsilógin verður dagførd og føroyskað, so at hon verður lagað til føroysk viðurskifti í enn størri mun. Samstundis verður gjørt vart við, at fyrilitið fyri borgarum, ið hava sinnisligar avbjóðingar, líðingar og sjúkur, eigur at vera munandi størri, so at Føroyar lúka altjóða krøv og sáttmálar, sum vit hava bundið okkum til.

Sinnisbati ger eisini viðmerkingar til § 189. Henda áseting viðvíkur tó sviki við heilivági, tað merkir, at roynt verður at seta evni til sølu sum heilivág, sum ikki eru tað. Mett verður ikki, at hendan áseting hevur týdning fyri tann bólk, sum Sinnisbati umboðar.

Hinvegin kunnu viðmerkingarnar hjá Sinnisbata hava týdning fyri § 191 í revsilógini, sum viðvíkur skerpandi revsing, um talan er um serliga grov brot á lóggávuna um euforiserandi evni. Flestu brot verða tó viðgjørd sambært vanligu lóggávuni um euforiserandi evni**.**

Sinnisbati ger vart við, at summi kunnu koma út í støður, har tey vegna sína sinnisliga viðkvæmu støðu ella sjúku kunnu koma sær í óføri uttan at vera tilvitað um avleiðingarnar av hendingunum. Við hesum verður ikki sagt, at ein ikki skal hava revsing, tá ið ein hevur gjørt eitt brotsverk, men tað hevur týdning, at skipanin hyggur nágreiniliga at, hvørji fólk tað snýr seg um, og hvørji støðu tey eru í. Ein annar partur av sama vandamáli er, at persónar, sum hava hava sinnisligar avbjóðingar og/ella rúsevnatrupulleikar, kunnu enda í tí støðu, at tey fáa vanliga fongsilrevsing, har eitt psykiatriskt viðgerðatilboð í summum førum kundi verið betur hóskandi. Neyðugt er at taka øll fyrilit, hvørjar avleiðingar fongsulrevsing kann hava fyri fólk við sinnisligum avbjóðingum, og um har eru tilboð, sum eru betur egnað. Havast skal í huga, at tað eru ung við dupultum diagnosum, sum ikki hava neyðugu tilboðini, og tá kann ein vanlig fongsulsrevsing vera beinleiðis skaðilig.

Løgmansskrivstovan er samd við Sinnisbata um, at hetta eru viðurskifti, vit eiga at vera varug við.

Í almenna partinum í revsilógini eru ásetingar um, nær umstøður kunnu metast sum linnandi, umframt ásetingar um aðrar rættarligar fylgjur av revsiverdari gerð, t.d. psykiatriskum viðgerðardómi og avvenjingarviðgerð. Hvørjir møguleikar eru fyri hesum í Føroyum, er Løgmansskrivstovan tó ikki greið yvir.

Hetta eru tó viðurskifti, sum kunnu takast upp í sambandi við dagføring av revsifulnaðarlógini (straffuldbyrdelsesloven).

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Mett verður ikki, at nýggja ásetingin í § 114 h, sum setur forboð fyri at taka ímóti peningaligum stuðli ella veitingum at brúka til at skipa, reka stovn ella fyritøku ella til líknandi endamál her á landi frá yvirgangsfelagsskapum, hevur nakrar avleiðingar fyri fyritøkur í Føroyum.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Í § 114 a, verður sett inn eitt nýtt nr. 7.
Broytingin hevur við sær, at føroysk lóggáva viðvíkjandi kjarnorkuyvirgangi verður í samsvari við sáttmála hjá Evroparáðnum um at fyribyrgja yvirgangi og ST-sáttmálan um at basa kjarnorkuyvirgangi.
Føroyar hava ikki bundið seg at hesum sáttmálum, men mett verður, at føroysk lóggáva eigur at fylgja evropeisku lóggávuni viðvíkjandi at fyribyrgja og basa yvirgangi.
Ásetingin hongur neyvt saman við § 114 a, nr. 1–6.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) Hoyvíkssáttmálin

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

2) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS
Nýggja ásetingin í § 191 a hevur 6 ára revsirammu fyri brot á løgtingslóg um forboð móti ávísum dopingevnum undir serliga skerpandi umstøðum. Henda revsiramman gevur løgregluni møguleika fyri at nýta fleiri av tvingsilsinntrivunum í rættargangslógini, t.d. telefonavlurting, dátuavlesing, at lata upp og steðga brøvum, órógv ella at bróta av telefon- ella telesamband og steingja heimasíður. Inntrivini kunnu bara verða framd eftir rættarúrskurð.

Av tí at talan er um álvarslig brotsverk, har vandamikil evni kunnu hava við sær munandi skaða á heilsuna og seta mannalív í vanda, verður mett, at inntrivini her standa mát við gerðirnar,

serliga tí talan er um brot undir serliga skerpandi umstøðum. Hetta kann t.d. vera skipaður og víðfevnandi dopinghandil, serliga grovir tilburðir og regluligari brot á dopinglóggávuna.

3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek
Uppskotið hevur hvørki jaligar ella neiligar avleiðingar fyri rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

4) CEDAW(Covention on the Elimination of Discrimination against Women)
Skotið verður upp at varðveita ásetingina um prostitutión í § 199, tó so at ásetingin verður gjørd óheft av kyni.
Hetta er í samsvari við Art. 2 í Kvinnusáttmálanum.

2.9. Markaforðingar
Tað eru ikki kendar markaforðingar á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið førir víðari galdandi rætt um revsing.

Broytingin í § 114 c, stk. 3, hevur við sær, at revsingin fyri brot á ásetingina kann vaksa til fongsul upp í 10 ár, um viðkomandi er við í einum vápnaðum liði ella undir serliga skerpandi umstøðum til fongsul upp í 16 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna slíkar, har viðkomandi hevur verið við í bardaga.

Mett verður, at skaðiliga árinið, sum vápnað lið, sum eru partar av yvirgangsfelagsskapum, kunnu hava á økini, tey virka í, hevur við sær, at tað er neyðugt at fáa innsett skerpaða revsirammu.

Mett verður eisini, at persónar, sum hava verið í vápnaðum bardaga fyri yvirgangsfelagsskapir, kunnu vera ein hóttan fyri tað samfelag, teir venda aftur til, av tí at teir í flestu førum eru radikaliseraðir og hava royndir í at nýta vápn. Hetta økir um vandan fyri yvirgangi.

Mett verður tí, at revsingin stendur mát við lógarbrotið og endamálið við ásetingunum í kapitli 13.

Tað sama er galdandi fyri broytingina í § 114 e.

Nýggja ásetingin í § 191 a hevur við sær, at revsingin fyri álvarslig brot á løgtingslóg um forboð móti ávísum dopingevnum kann vaksa til fongsul upp til 6 ár, um talan er um serliga skerpandi umstøður.
Mett verður, at skaðiligu árinini, sum doping kann hava á heilsuna, og teir skaðar, sum dopingevni kunnu hava við sær, gera, at talan er um eitt álvarsligt brotsverk, og at revsingin stendur mát við brotsverkið, tá ið talan er um serliga skerpandi umstøður.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið gevur ikki landsstýrismanninum, stovni undir undir landsstýrinum ella kommunum nakrar heimildir.
Heimildir sambært §§ 110 f og 118 a liggja hjá danska løgmálaráðharranum.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Nýggja ásetingin í § 191 a hevur 6 ára revsirammu. Hetta hevur við sær, at løgreglan kann við rættarúrskurði nýta tvingsilsinntriv eftir rættargangslógini, sum t.d. telefonavlurting.
Mett verður, at hesin møguleikin er neyðugur fyri at kunna eftirkanna álvarslig brot á doping-lóggávuna.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar á altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Ætlanin við hesum lógaruppskotinum er í høvuðsheitum at føroyska revsilógina umframt at gera ymiskar dagføringar av lógini. Dagføringarnar í hesum umfarinum eru serliga í kapitli 12 og 13, umframt onkrar smávegis dagføringar aðrastaðni í lógini. Tað eru bara broytingarnar, sum verða viðgjørdar, umframt at greitt verður frá teimum førum, har málsligir spurningar hava stungið seg upp.

Í sambandi við, at revsilógin verður føroyskað, skal verða gjørt vart við, at tað ikki er ætlanin, at føroyski teksturin innihaldsliga skal víkja frá danska tekstinum uttan í teimum førum, har føroysk viðurskifti hava gjørt, at onkrar ásetingar í danska tekstinum ikki eru tiknar við. Í hesum førum verður tað greitt tilskilað í serligu viðmerkingunum.
Í kapitli 12 og 13 er danski staturin og danskir myndugleikar sum heild broytt til Føroyar og føroyskar myndugleikar. Tað ber eisini í sær, at stovnar og myndugleikar eru broyttir samsvarandi til føroyskar stovnar og myndugleikar. Umframt hetta er ikki ætlanin at víkja frá danska tekstinum uttan í teimum førum, har tað verður greitt tilskilað.

Til nr. 1
Partur II í revsilógini er við hesum lógaruppskotinum liðugt dagførdur. Heitið á hesum parti verður "Serligur partur".

Til nr. 2
Kapittul 12
Brotsverkini í hesum kapitli snúgva seg um álop og hóttanir ímóti ytru trygdini hjá landinum. Í galdandi lóggávu er talan um álop og hóttanir ímóti danska statinum og donskum myndugleikum. Av tí at lóggávan nú er á føroyskum hondum, verður mett týdningarmikið, at lóggávan vísir hetta. Danski staturin og danskir myndugleikar eru tí allastaðni broytt til Føroyar og føroyskar myndugleikar. Ásett verður tó í § 110 g, at gerðir nevndar í §§ 98–110 a mótvegis danska statinum ella myndugleikum tess vera revsaðar á sama hátt, sum gerðir mótvegis Føroyum og føroyskum myndugleikum.
Tað er ikki ætlanin, at teksturin annars skal víkja frá danska tekstinum uttan í teimum førum, har føroysk viðurskifti hava gjørt, at onkrar ásetingar í danska tekstinum ikki eru tiknar við. Í hesum førum verður tað greitt tilskilað.

Heitið
Heitið á kapitli 12 í donsku revsilógini er: "Landsforæderi og andre forbrydelser mod statens selvstændighed og sikkerhed". Heitið endurspeglar, at Danmark er sjálvstøðugt ríki. Føroyar eru ikki sjálvstøðugt ríki, men vit hava ræði á teimum málsøkjum, sum eru yvirtikin, og hava eina stjórn og eitt Løgting, sum taka avgerðir vegna Føroya fólk. Kapittul 12 verjir hesar skipanir ímóti hóttanum uttaneftir, sum til dømis royndir at leggja Føroyar undir fremmant vald ella at koma Føroyum út í kríggj ella herseting. Heitið á kapitli 12 er av hesum orsøkum týtt soleiðis: "Landasvik og onnur brotsverk ímóti sjálvsavgerðarrætti og trygd Føroya fólks o.a."

§ 98
Stk. 1
Orðingin "at bringe den danske stat eller nogen del af denne under fremmed herredømme eller at løsrive nogen del af staten" er broytt til "at loysa ella leggja Føroyar ella partar av Føroyum

undir fremmant vald". Orðingin er ein tillaging til føroysk viðurskifti og hevur við sær, at ásetingin nú einans viðvíkur brotsverkum ímóti Føroyum.
Við "Føroyar" skal skiljast "Føroya land" sum ein parallellur til "danski staturin". Tað merkir, at hugsað verður ikki bara um landið, men eisini um t.d. sjóøki, myndugleikar og jurisdiktión umborð á føroyskum førum. Í norsku revsilógini verður somuleiðis heitið "Noreg" nýtt og ikki "norski staturin".
Danski staturin fevnir um Danmark, Føroyar og Grønland, og orðingin í galdandi lóg er í samsvari við hetta. Hóast Føroya land skal skiljast sum ein parallellur til "danski staturin", so eru Føroyar ikki eitt sjálvstøðugt ríki, og neyðugt hevur tí verið at umorða ásetingina í ávísan mun. Ætlanin er ikki at gera aðrar broytingar í ásetingini.

Brotsverk ímóti danska statinum og myndugleikum hansara eru fevnd av § 110 g.

Stk. 2
Danska orðingin "iværksætte" er týdd til "skipa fyri". Hóast merkingin møguliga ikki er heilt tann sama, verður mett, at orðingin kann nýtast.

Danska orðingin "foranstaltning" er týdd til "virksemi". Hóast merkingin møguliga ikki er heilt tann sama, verður mett, at orðingin kann nýtast.

Ætlanin er ikki, at ásetingin við hesum orðingum skal víkja innihaldsliga frá donsku ásetingini.

Danska orðingin "mere omfattende" er týdd til: "umfatandi". Mett verður, at hetta merkir tað sama, og ætlanin er ikki at broyta ásetingina innihaldsliga.

Danska orðingin "sabotage" er í samráð við Málráðið týdd til: "sabotasja", av tí at Málráðið metir hetta orð vera neyvari enn eitt nú "herverk" ella "skemdarvirksemi", sum ikki merkja rættiliga tað sama sum "sabotasja".

§ 99
Stk. 1
Orðingin "den danske stat eller nogen med den for krigstilfælde forbunden stat" er broytt til "Føroyum ella okkara sameindu". Hetta er ein tillaging til føroysk viðurskifti. Orðingin speglar, at Føroyar ikki sjálvar hava stríðsføri og tí ikki einsamallar kunnu vera í hersamgongu við øðrum ríki. Mett verður tó, at Føroyar kunnu hava sameind, og tað er tað, hesar ásetingar skulu verja.

Orðingin "den danske stats bestemmelsesfrihed" er broytt til "avgerðarrætt Føroya". At júst hendan orðing er vald, hongur saman við, at Føroyar eru partur av danska ríkinum, og at tað tí ikki verður mett rætt at nýta orðingina "avgerðarfrælsi".

Brotsverk ímóti danska statinum eru tó fevnd av § 110 g.

Stk. 2
"Dansk statsområde" er týtt til "Føroyar". Hetta er ein tillaging til føroysk viðurskifti og hongur saman við, at revsirætturin nú er føroyskt málsøki.

Brotsverk ímóti danska statinum er tó fevnt av § 110 g.

§ 100
Orðingin "den danske stat" er broytt til "Føroyar". Hetta hevur við sær, at ásetingin nú einans viðvíkur brotsverkum ímóti Føroyum. Sí annars um nýtsluna av hugtakinum "Føroyar" undir viðmerkingunum til § 98.

Brotsverk ímóti danska statinum eru fevnd av § 110 g.

§102
Ásetingin viðvíkur stuðli til fíggindan ella hersetingarvaldið í sambandi við kríggj ella tvingaða herseting, og sum má metast sum landasvik.

Orðingin er lagað til føroysk viðurskifti. Av tí at Føroyar ikki sjálvar hava stríðsføri og tí heldur ikki kunnu vera stríðsfelagi við nakað annað ríki, er "svækker den danske stat eller dens forbundsfælles kampdygtighed" broytt til: "veikir stríðsføri ríkisins ella stríðsfelaga tess".

Í stk. 2 er ein uppreksing av, hvørji viðurskifti eru at rokna sum stuðul til fíggindan.
Viðurskiftini eru ikki lýst út í æsir.

Ætlanin er annars ikki at gera innihaldsligar broytingar í ásetingini.

Brotsverk ímóti danska statinum eru fevnd av § 110 g.

Danska orðingin "ved råd eller dåd" er í samráð við Málráðið týtt til: "við ráði ella verki". Dåd merkir, at viðkomandi hevur ein virknan part, og tí metir Málráðið at "verki" kundi verið hóskandi.

Danska orðingin "hvervning til eller tjenstgøring i" er í samráð við Málráðið týtt til: "innskriving til og hertænasta fyri".

Orðingin "angiveri" er í samráð við Málráðið týtt til: "smettan". Orðið er í brúki, t.d. hevur ein føroysk bók heitið: "Søgusmettan", og tí metir Málráðið, at hetta er í lagi.

Danska orðingin "virker til fremme af dennes interesser" er týdd til: "fremur áhugamál tess". Hóast merkingin møguliga ikki er líka breið, verður mett, at orðingin kann nýtast. Ætlanin er ikki við hesum at gera innihaldsligar broytingar.

Danska orðingin "overhængende fare" er í samráð við Málráðið týtt til: "hóttandi vandi".

Danska orðingin "mishandling af fanger" er týtt til: "mishandling av fangum". Orsøkin til hesa orðing er, at sama orðing verður nýtt í § 245 í sambandi við serliga ráum, grovum ella vandamiklum likamsálopi.

§ 103
Í stk. 1 er orðingin "den danske stat" broytt til: "føroyskir myndugleikar". Hetta hevur við sær, at tað bert eru sáttmálar viðvíkjandi fyriskipanum, ið føroyskir myndugleikar hava avgjørt at seta í verk, sum eru fevndir av ásetingini.
Brotsverk ímóti danska statinum eru tó fevnd av § 110 g.

Danska orðingin “truende udsigt dertil” er týdd til: “stórur vandi er fyri”. Hetta merkir møguliga ikki rættiliga tað sama sum danska orðingin, men ætlanin er ikki við hesum at broyta ásetingina innihaldsliga.

§ 104
Stk. 1
Danska orðingin “på utilbørlig måde” er týdd til “á óhøviligan hátt”.
Stk. 2
Danska orðingin “særlig stødende optræden” er týdd til “serliga ódámliga framferð”.

Stk. 3
Danska orðingin “utilbørligt forhold” er týdd til “óhøvilig framferð”.

§ 105
Orðingin “krænke danske myndigheders bestemmelsesfrihed” er broytt til: “at gera seg inn á avgerðarrættin hjá føroyskum myndugleikum”. Hetta hevur við sær, at bert føroyskir myndugleikar eru fevndir av ásetingini.
Danska orðingin “bestemmelsesfrihed” er týdd til “avgerðarrættur”. At júst hendan orðing er vald, hongur saman við, at Føroyar eru partur av danska ríkinum, og at tað tí ikki verður mett rætt at nýta orðingina “avgerðarfrælsi”.

Brotsverk ímóti donskum myndugleikum eru tó fevnd av § 110 g.

§ 106
Orðingin “statens tarv” er broytt til: “tørvi landsins”, og orðingin “statens vegne” er broytt til: “fyri Føroyar”. Við hesum verður meint við “Føroya land” sum ein parallellur til “danski staturin” (sí annars viðmerkingarnar til § 98).
Hetta hevur við sær, at bert samráðingar fyri Føroyar eru fevndar av ásetingini.

Brotsverk ímóti danska statinum eru tó fevnd av § 110 g.

§ 107
Orðingin “hensyn til danske stats- eller samfundsinteresser” er broytt til: “landsáhugamálum ella samfelagsáhugamálum”, við hesum verður meint við áhugamálum og samfelagsáhugamálum hjá Føroya landi (sí annars viðmerkingar til § 98). Hetta hevur við sær, at bert upplýsingar um viðurskifti, ið skuldu haldast loynilig við fyriliti fyri landsáhugamálum og samfelagsáhugamálum, eru fevnd av ásetingini.

Brotsverk ímóti danska statinum eru tó fevnd av § 110 g.

§ 108
Orðingin “virke indenfor den danske stats område” er broytt til: “at virka í landinum”. Við hesum verður meint við Føroya landi (sí annars viðmerkingar til § 98). Hetta hevur við sær, at bert viðurskifti viðvíkjandi Føroyum eru fevnd av ásetingini.

Brotsverk ímóti danska statinum eru tó fevnd av § 110 g.

§ 109

Skotið verður upp, at í § 109, stk. 2 verður "fængsel indtil 3 år eller under formildende omstændigheder med bøde" broytt til: "sekt ella fongsul í upp til 3 ár".

Ásetingin varð broytt í Danmark í 2003. Tá varð eisini § 110, stk. 2 broytt. Broytingin varð í Danmark gjørd fyri at gera revsirammuna einfaldari.
Samstundis varð § 82, sum viðvíkur linnandi umstøðum, tá ið revsing skal ásetast, broytt í donsku revsilógini.
Broytingarnar í § 109, stk. 2 og § 110, stk. 2 vóru ein avleiðing av hesi broyting.

§ 82 og § 110, stk. 2 eru longu broyttar í galdandi føroysku lóggávuni, men § 109, stk. 2 er dottið burtur ímillum. Við broytingini verður rættarstøðan nú tann sama í Føroyum og Danmark.

Orðingin "statens hemmelige underhandlinger, rådslagninger eller beslutninger i sager, hvorpå statens sikkerhed eller rettigheder i forhold til fremmede stater beror" er broytt til: "loyniligar samráðingar, ráðleggingar ella avgerðir hjá landinum í málum, sum trygd landsins ella rættindi við fremmand lond er treytað av". At orðingin lond verður nýtt, er ein avleiðing av, at revisrætturin nú er føroyskt málsøki. Orðingin verður nýtt sum ein parallellur til orðingina "statur" (sí annars viðmerkingarnar til § 98).
Hetta hevur við sær, at bert viðurskifti viðvíkjandi Føroyum eru fevnd av ásetingini.

Brotsverk ímóti danska statinum eru tó fevnd av § 110 g.

§ 110 a
Skotið verður upp at strika stk. 2. Ásetingin viðvíkur sekt, um loftmyndir uttan loyvi verða tiknar úr loftfari.
Í donsku revsilógini eru tað bert vinnuligar loftmyndir, ið krevja loyvi, men aðrar loftmyndir krevja ikki loyvi.
Av tí at vit í Føroyum ongar reglur hava um loyvi at taka vinnuligar loftmyndir úr loftfari, og loyvi sostatt ikki fæst í Føroyum at taka tílíkar myndir, verður mett, at ásetingin eigur at strikast.
Hóast stk. 2 verður strikað, eru loftmyndir av hernaðarligum verjustøðum, goymslum, deildum, vápnum, útgerð o.ø. hjá ríkinum fevndar av stk. 1, og tílíkar myndir kunnu tí ikki verða tiknar uttan neyðugt loyvi.

§ 110 b
Orðingin "neutralitetskrænkelser mod den danske stat" er týdd til: "ger seg inn á uttanveltastøðu ríkisins".
Ætlanin er ikki at gera innihaldsligar broytingar.

§ 110 c
Stk. 1
Orðingin "statens forsvarsforanstaltninger og neutralitetsforanstaltninger" er týdd til: "verjufyriskipan og uttanveltafyriskipan ríkisins".
Ætlanin er ikki at gera innihaldsligar broytingar.

Stk. 2
Skotið verður upp, at í § 110, stk. 2 verður "under skærpende omstændigheder med fængsel indtil 4 år straffes den, som forsætligt eller uagtsomt overtræder bestemmelser eller forbud"

broytt til: “undir serliga skerpandi umstøðum við fongsli í upp til 4 ár verður tann revsaður, sum brýtur áseting ella forboð”.

Ásetingin varð broytt í Danmark í 2003. Broytingin varð í Danmark gjørd fyri at gera revsirammuna einfaldari og var ein avleiðing av, at § 81, sum viðvíkur skerpandi umstøðum, varð broytt. Samstundis varð eitt nýtt stykki sett inn í § 110 c, stk. 3, so at brot, sum eru framd í ósketni, fingu sítt egna stykki.

§ 81 og § 110 c, stk. 3 eru longu broyttar í galdandi føroysku lóggávuni, men § 110 c, stk. 2 er av onkrari orsøk dottin burtur ímillum. Við broytingini verður rættarstøðan nú tann sama í Føroyum og Danmark. Eins og við donsku broytingini er ikki ætlanin við hesum at broyta galdandi revsingarøkið ella støðið á revsingarásetingini.

§ 110 d
Danska orðingin “fremmed statsoverhoved” er týdd til: “útlendskum ríkisleiðara”. Í kriminallov for Grønland frá 2007 hevur danska løgmálaráðið nýtt orðingin “rige” og ikki “stat”, júst tí talan er um Grønland. Orðingin er tí ein tillaging til føroysk viðurskifti, og ætlanin er ikki at gera innihaldsligar broytingar við hesi orðing.

Danska orðingin “fremmed diplomatisk mission” er týdd til: “útlendskari sendistovu”.

§ 110 e
Skotið verður upp, at flaggið hjá Evropasamveldinum verður strikað. Hetta er grundað á, at Føroyar ikki eru partur av Evropasamveldinum, og at tað tí ikki verður mett rætt at draga hetta flagg fram um onnur fløgg. Ætlanin er tó framvegis, at flaggið hjá Evropasamveldinum skal vera fevnt av forboðnum ímóti alment at háða fløgg.
Ætlanin er ikki annars at gera innihaldsligar broytingar.
Tá ið orðingin “land” verður nýtt, er hetta meint sum ein parallellur til orðingina “stat” (sí annars viðmerkingarnar til § 98).

§ 110 f
Orsøkin til at hendan áseting er varðveitt, er tann, at tað er ásett í yvirtøkulógini, at brotsverk í kapitli 12, eisini eftir at Føroyar hava yvirtikið revsirættin, framhaldandi skulu lógsøkjast við almennari átalu eftir boðum frá danska løgmálaráðharranum.
Hetta er eisini knýtt at, at hóast revsirætturin er føroyskur, so er ákærumyndugleikin framvegis felags málsøki, og so leingi ákæruvald, politi og dómsvald ikki eru yvirtikin málsøki, er tað danski løgmálaráðharrin, sum er ovasti myndugleiki fyri ákæruvaldið.

§ 110 g
Skotið verður upp, at ein nýggj áseting verður sett inn í § 110 g, sum ásetur, at brotsverk eftir §§ 98–110 somuleiðis verða revsað, um tey verða framd ímóti danska statinum ella myndugleikum tess, herundir kongi, Fólkatingi og Hægstarætti.
Hóast kap. 12 viðvíkur ytru trygdini hjá ávikavist Føroyum og danska statinum, so er kongur, Fólkating og Hægstirættur tikin við í ásetingini, fyri at eingin ivi skal vera um, at hesi eru fevnd.

Talan er um eina nýggja áseting, har ásett verður, at brotsverk eftir §§ 98–110 verða revsað á sama hátt sum brotsverk ímóti Føroyum og føroyskum myndugleikum. Hetta er fyri at staðfesta, at við nýggju orðingunum av ásetingunum í §§ 98–110 er eingin innihaldslig broyting ætlað viðvíkjandi, hvørjir myndugleikar eru fevndir.

Til nr. 3
Kapittul 13
Brotsverkini í hesum kapitli hanga neyvt saman við ásetingunum í kapitli 12. Hesin kapittulin snýr seg um álop og hóttanir ímóti innaru trygdini í landinum og ímóti demokratisku samfelagsskipanini og gerðum, sum tarna ella bróta niður virksemið hjá fólkastýrinum.

Í galdandi lóggávu er talan um álop og hóttanir ímóti donsku stjórnarskipanini og ímóti hægstu statsmyndugleikum í Danmark. Av tí at lóggávan nú er á føroyskum hondum, verður mett týdningarmikið, at lóggávan speglar hetta. Danski staturin og danskir myndugleikar eru tí allastaðni broytt til Føroyar og føroyskar myndugleikar. Ásett verður tó í § 118 b, at gerðir nevndar í §§ 111–116 mótvegis danska statinum ella myndugleikum tess, herundir kongi, Fólkatingi og Hægstarætti, verða revsað á sama hátt.
Tað er ikki ætlanin, at teksturin annars skal víkja frá danska tekstinum uttan í teimum førum, har føroysk viðurskifti hava gjørt, at onkrar ásetingar í danska tekstinum ikki eru tiknar við. Í hesum førum verður tað greitt tilskilað.

Heitið
Heitið á kapitli 13 í donsku revsilógini er: "Forbrydelser mod statsforfatningen og de øverste statsmyndigheder, terrorisme m.v." Heitið endurspeglar, at Danmark er sjálvstøðugt ríki. Kapittul 13 verjir stýrisskipanina og landsmyndugleikarnar í Føroyum ímóti royndum at seta hesar skipanir úr gildi ella at gera seg inn á løgmann ella landsstýrismenn o.a. Heitið á kapitli 13 er av hesum orsøkum týtt soleiðis: "Brotsverk ímóti stýrisskipan og landsmyndugleikum føroyinga, yvirgangur og annað". Orðingin "statsforfatning" kann bæði týðast til "stýrisskipan" og "stjórnarskipan". Orsøkin til, at orðingin "stýrisskipan" er vald, er ein tillaging til føroysk viðurskifti og hongur saman við, at vit hava eina stýrisskipanarlóg í Føroyum. Danska grundlógin er eisini partur av føroysku stýrisskipanini.

§ 111
Orðingin "statsforfatningen" er týdd til: "stýrisskipanin" (sí annars viðmerking til heitið).
Brotsverk ímóti donsku stjórnarskipanini eru fevnd sambært § 118 b.

§ 112
Orðingin "kongen eller den, der med hjemmel i forfatningen fører regeringen" er broytt til "tí, sum við heimild í stýriskipanini leiðir landsstýrið".
Broytingin er grundað á, at revsilógin nú er føroyskt málsøki.
"Stýrisskipanin" skal skiljast sum ein parallellur til "forfatningen" og "landsstýri" sum ein parallellur til "regeringen". Ásetingin verjir hægsta myndugleika í Føroyum ímóti álopið, tá ið viðkomandi virkar sum leiðari av landsstýrinum.

Brotsverk ímóti kongi og tí, sum við heimild í donsku stjórnarskipanini leiðir stjórnina, eru tó fevnd sambært § 118 b, har tað verður beinleiðis víst til kong í stk. 1 og 2.

§ 113
Stk. 1
Orðingin "Folketingets sikkerhed eller frihed" er broytt til: "trygd ella frælsi Løgtingsins". Hetta er grundað á, at revsilógin nú er føroyskt málsøki.
Brotsverk ímóti danska Fólkatinginum eru tó fevnd sambært § 118 b, stk. 1, har tað beinleiðis verður víst til Fólkatingið.

Stk. 2
Orðingin "kongen eller den, der med hjemmel i forfatningen fører regeringen, eller mod minstrene, Rigsretten eller Højesteret" er broytt til: "tí, sum við heimild í stýrisskipanini leiðir landsstýrið, ella ímóti landsstýrismonnum".
Hetta er grundað á, at revsilógin nú er føroyskt málsøki.
"Stýrisskipanin" skal skiljast sum ein parallellur til "forfatningen" og "landsstýri" sum ein parallellur til "regeringen". Ásetingin verjir hægstu myndugleikar í Føroyum ímóti álopi, og eftir umstøðunum einstøku persónarnar, tá ið hesir virka sum partar av myndugleikanum.

Brotsverk ímóti tí, sum við heimild í donsku stjórnarskipanini leiðir stjórnina, ímóti ráðharrunum og ímóti Hægstarætti eru fevnd sambært § 118 b, stk. 1, har beinleiðis verður víst til donsku stjórnina og til Hægstarætt.
Av tí at Ríkisrætturin verður settur í Danmark, og brotsverk ímóti honum tí eru fevnd av donsku revsilógini, eru hesi brotsverk ikki tikin við í føroysku revsilógina.

§ 114
Í stk. 1 er nr. 6 broytt, so at ásetingin samsvarar við donsku lóggávuna. Í galdandi lóggávu kunnu grov brot á vápnalóggávuna eftir § 192 a ella § 7 í løgtingslóg om våben m.v. revsast. Broytingin ber í sær, at brot á lóggávuna um vápn og spreingievni kunnu revsast undir serliga skerpandi umstøðum eftir § 192 a.
Orðingin "danske myndigheder" er broytt til: "føroyskan myndugleika".
Brotsverk ímóti danska statinum og myndugleikum hansara eru tó fevnd sambært § 118 b.

Orðingin "forfatningsmæssige strukturer" er týdd til: "stýrisskipanarliga bygnaðin". "Statsforfatning" kann bæði týðast til "stýrisskipan" og "stjórnarskipan". Orsøkin til, at orðingin "stýrisskipan" er vald, er ein tillaging til føroysk viðurskifti og hongur saman við, at vit hava eina stýrisskipanarlóg í Føroyum. Danska grundlógin er eisini partur av føroysku stýrisskipanini. Brotsverk ímóti danska statinum og myndugleikum hansara eru fevnd av § 118 b, stk. 1.
Í donsku ásetingini verður orðingin "økonomiske eller samfundsmæssige strukturer" nýtt í sambandi við lýsingina av, hvat skal roknast sum yvirgangur. Hetta er týtt til "búskaparliga og samfelagsliga bygnaðin". Ásetingin viðvíkur avlagan ella oyðileggjan av grundleggjandi skipanum og bygnaðum. Mett verður, at orðingin "búskaparliga bygnaðin" er betri enn "fíggjarliga bygnaðin" í hesum høpi. "Búskaparliga bygnaðin" er breiðari hugtak, har "fíggjarliga bygnaðin" er partur av hugtakinum.

Í stk. 1 er orðingin "alvorlig skade" týdd til: "munandi skaða". Ætlanin er ikki við hesum at gera innihaldsligar broytingar.

Í stk. 1, nr. 4 er orðingin "samfærdselsmidler" týtt til: "samferðslutólum" og "betydelige økonomiske tab" týtt til "munandi fíggjarligt tap". Ætlanin er ikki við hesum at gera innihaldsligar broytingar.

§ 114 a
Í stk. 1, nr. 1, nr. 4, nr. 5 og nr. 6 er tilvísingin til § 192 a, stk. 2 broytt til: § 192 a. Hetta hongur saman við broytingini í nr. 4, har skotið verður upp at strika § 192 a, stk. 2.

Skotið verður eisini upp at seta eitt nýtt nr. 7 inn. Broytingin ger, at føroysk lóggáva viðvíkjandi kjarnorkuyvirgangi verður í samsvari við sáttmálan hjá Evroparáðnum um at fyribyrgja yvirgangi og ST-sáttmálan um at basa kjarnorkuyvirgangi.

Sambært ásetingini hevur brot á § 192 b (um at hava geislavirkin evni undir hond og nýtslu av hesum o.a.), § 260 (um ólógligan tvingsil) ella § 266 (hóttanir), tá ið gerðin er fevnd av art. 2 í sáttmála Sameindu Tjóða um kjarnorkuyvirgang, við sær, at revsingin kann fara upp um strangastu revsingina fyri lógarbrotið, við upp í eina helvt. Um strangasta revsingin fyri lógarbrotið er minni enn 4 ár, kann revsingin tó vaksa til fongsul upp til 6 ár.
Í samsvari við tað, sum er galdandi fyri gerðir fevndar av § 114 a, nr. 1–6, er nýggja ásetingin ikki avmarkað til gerðir, framdar við tilætlan um yvirgang.
Hetta hevur við sær, at tað ikki í øllum førum (sum í § 114 í revsilógini) skal vera tilætlan um at loypa stóra ræðslu á íbúgvarnar í einum landi ella av órøttum at tvinga føroyskan myndugleika ella útlendskan almennan myndugleika ella altjóða felagsskap til at gera ella lata vera við at gera okkurt ella at avlaga ella oyðileggja grundleggjandi politiska stjórnar-skipanarliga, stýrisskipanarliga, búskaparliga ella samfelagsliga bygnaðin í einum landi ella altjóða felagsskapi.
Ásetingin kann verða nýtt í teimum førum, at treytirnar í § 114 ikki eru loknar.

Uppskotið hevur við sær, at tað sambært § 114 c, stk. 1 (um útvegan av persónum til at fremja gerðir eftir §§ 114 og 114 a) og § 114 d, stk. 1 (um uppvenjing), við tað at víst verður til nevndu ásetingar í § 114 a, hereftir er revsivert at útvega persónar til og uppvenja persónar í gerðum fevndar av § 192 b (um at hava geislavirkin evni undir hond og nýtslu av hesum o.a.), § 260 (um ólógligan tvingsil) ella § 266 (hóttanir) í revsilógini, tá ið gerðin er fevnd av art. 2 í sáttmála Sameindu Tjóða um kjarnorkuyvirgang.

Harafturat ber uppskotið við sær, at tað sambært § 114 c, stk. 2 og § 114 d, stk. 2, við tað at víst verður til § 114 b um fígging av gerðum, sum eru fevndar av § 114 a, hereftir er revsivert, hóast talan ikki er um tilætlan um yvirgang, at útvega til ella uppvenja í beinleiðis ella óbeinleiðis fíggjarligum stuðli o.a. til ein persón, ein bólk ella til eina samskipan, sum fremur ella ætlar at fremja eina gerð, sum er fevnd av § 192 b, § 260 ella § 266 í revsilógini, tá ið gerðin er fevnd av art. 2 í sáttmála Sameindu Tjóða um kjarnorkuyvirgang.

Uppskotið ber harafturat í sær, at eftir tí serligu regluni um viðvirkan í § 114 e, við tað at víst verður til § 114 a og §§ 114 b-d, sambært § 114 a, hereftir er revsivert aðramáta at stuðla persóni, bólki ella samskipan, sum fremur ella ætlar at fremja gerð, ið er fevnd av § 192 b, § 260 ella § 266 í revsilógini, tá ið gerðin er fevnd av art. 2 í sáttmála Sameindu Tjóða um kjarnorkuyvirgang, hóast talan ikki er um tilætlan um yvirgang.

Uppskotið hevur eisini við sær, at virkisøkið fyri § 136, stk. 2 í revsilógini, sum viðvíkur tí, sum alment og týðiliga tekur undir við brotsverki, sum hoyrir til kapittul 12 ella 13 í hesi lóg, verður revsað við sekt ella fongsli upp til 2 ár, verður víðkað. Ásetingin fer hereftir eisini at fevna um tann, sum alment og týðiliga tekur undir við gerðum fevndar av § 114 a, nr. 7.

Hóast Føroyar ikki hava bundið seg til sáttmálan hjá Evroparáðnum um at fyribyrgja yvirgangi og ST-sáttmálan um at basa kjarnorkuyvirgangi, so verður mett, at føroysk lóggáva eigur at fylgja evropeiskari lóggávu viðvíkjandi yvirgangi.

§ 114 b

Uppsetingin av § 114 b er broytt eitt sindur, av tí at mett varð, at uppsetingin av galdandi áseting var ógreið. Talan er einans um eina tekniska broyting. Ætlanin er ikki við hesum at gera innihaldsligar broytingar.

Í danska tekstinum verður orðingin "hensigt at begå handlinger" týtt til: "ætlar at fremja eina gerð". Føroyskt nýtir í størri mun eintal enn danskt, og mett verður ikki, at tað í hesum førinum hevur týdning fyri innihaldið, um eintal ella fleirtal verður nýtt. Ætlanin er ikki við hesum at gera innihaldsligar broytingar.

Í nr. 1 verður orðingin "økonomisk støtte" týtt til: "fíggjarstuðul". Mett verður, at hetta er rættari enn "búskaparligan stuðul".

Í nr. 2 verður "midler" í samráð við Málráðið týtt til: "fígging ella onnur ráð". Málráðið metir, at "midler" er eitt nógv víðari hugtak enn "fígging". Við at taka "onnur ráð" við, verður roynt at fáa ta breiðaru merkingina av "midler" við.

Í nr. 3 er "penge, andre formuegoder eller finansielle eller andre lignende ydelser" týtt til: "pening, ognarlutir ella fíggjarligar ella aðrar slíkar veitingar".

§ 114 c
Stk. 1
Orðingin "hverver en person til at begå eller fremme handlinger" er týdd til: "útvegar ein persón til at fremja ella stuðla undir gerðir".
Ætlanin er ikki at gera innihaldsligar broytingar.

Orðingin "tilfælde, hvor der er tale om overtrædelser af systematisk eller organiseret karakter" er týdd til: "brot, sum eru av regluligum ella skipaðum slag". Hóast "tilfælde" ikki er tikið við í týðingina, er ætlanin ikki at gera innihaldsligar broytingar.

Stk. 2.
"Orðingin "hverver en person til at begå eller fremme handlinger" er týdd til: "útvegar ein persón til at fremja ella stuðla undir gerðir".

Stk. 3.
Ásetingin viðvíkur tí, sum tekur við boði at fremja gerðir, ið fevndar eru av § 114 og § 114 a.

Skotið verður upp at seta skerpaða revsirammu inn fyri brot á § 114 c, stk. 3, tá ið gerningsmaðurin er við í einum vápnaðum liði.

Vápnað lið skal skiljast sum ein vápnaður bólkur, sum í ávísan mun er skipaður. Hugtakið skal skiljast við útgangsstøði í fólkarættinum. Hugtakið fevnir um bæði statslig og ikki-statslig vápnað lið.

Tann skerpaða revsiramman skal nýtast, tá ið brot á § 114 c, stk. 3 hongur saman við, at gerningsmaðurin er við í einum vápnaðum liði, tað merkir, tá ið ein persónur er við í einum vápnaðum liði og tekur við boðum um at fremja gerðir, ið fevndar eru av § 114 ella § 114 a í sambandi við, at hann útinnir uppgávur sum partur av virkseminum hjá einum vápnaðum liði.

Skotið verður upp, at revsiramman skal vera fongsul upp til 10 ár ella undir serliga skerpandi umstøðum fongsul upp til 16 ár.

Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna slíkar, har viðkomandi hevur verið við í bardaga. Hóast viðkomandi ikki hevur verið í bardaga, er møguligt, at tað kunnu vera serliga skerpandi umstøður, men virkisøkið fyri fongsul upp til 16 ár er í serligum føri, har tað kann prógvast, at viðkomandi hevur verið í bardaga.

Bardagi fevnir í hesum førinum serliga um beinleiðis nýtslu av vápnum, at bera vápn til og frá stað, har bardagi er, at savna upplýsingar um vápnað lið hjá mótpartinum, at geva upplýsingar um mál fyri beinleiðis at lætta um álop á tey, at flyta stríðsmenn til og frá støðum, har stríðið fer fram, at flyta lóður til eitt stað, har tað verður brúkt í stríði, at fyrireika hernaðartiltøk og at senda stríðsmenn at fremja álop.

Danska orðingin "lade sig hverve til at begå handlinger omfattet af" er týdd til: "tekur við boði at fremja gerðir, ið fevndar eru av".
Ætlanin er ikki við hesum at gera innihaldsligar broytingar.

Danska orðingin "er den pågældende tilsluttet en væbnet styrke" er í samráð við Málráðið týtt til: "virkar viðkomandi fyri eitt vápnað lið". Ætlanin er ikki við hesum at broyta ásetingina innihaldsliga.

§ 114 d
Orðingin "tilfælde, hvor der er tale om overtrædelser af systematisk eller organiseret karakter" er týdd til: "brot, sum eru av regluligum ella skipaðum slag".
Hóast "tilfælde" ikki er tikið við í týðingina, er ætlanin ikki at gera innihaldsligar broytingar.

§ 114 e
Sambært § 114 e verður við fongsli í upp til 6 ár tann revsaður, sum á annan hátt stuðlar virksemi hjá persóni, bólki ella samskipan, sum fremur ella ætlar at fremja gerð, ið er fevnd av §§ 114, 114 a, 114 b, 114 c, ella 114 d.

Skotið verður upp at seta skerpaða revsirammu inn fyri brot á § 114 e, tá ið gerningsmaðurin er við í einum vápnaðum liði.

Vápnað lið skal skiljast sum ein vápnaður bólkur, sum í ávísan mun er skipaður. Hugtakið skal skiljast við útgangsstøði í fólkarættinum. Hugtakið fevnir um bæði statslig og ikki-statslig vápnað lið.

Tann skerpaða revsiramman skal nýtast, tá ið brot á § 114 e hongur saman við, at gerningsmaðurin er við í einum vápnaðum liði, tað merkir, tá ið ein persónur, sum er við í einum vápnaðum liði, stuðlar bólki ella samskipan, sum fremur ella ætlar at fremja gerð, ið er fevnd av §§ 114, 114 a, 114 b, 114 c ella 114 d í sambandi við, at hann útinnir uppgávur sum partur av einum vápnaðum liði.

Skotið verður upp, at revsiramman skal vera fongsul í upp til 10 ár ella undir serliga skerpandi umstøðum fongsul í upp til 16 ár.
Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna slíkar, har viðkomandi hevur verið við í bardaga. Hóast viðkomandi ikki hevur verið í bardaga, er møguligt, at tað kunnu vera serliga skerpandi umstøður, men virkisøkið fyri fongsul í upp til 16 ár er serliga føri, har tað kann prógvast, at viðkomandi hevur verið í bardaga.

Bardagi fevnir í hesum førinum serliga um beinleiðis nýtslu av vápnum, at bera vápn til og frá stað, har bardagi er, at savna upplýsingar um vápnað lið hjá mótpartinum, at geva upplýsingar um mál fyri beinleiðis at lætta um álop á tað, at flyta stríðsmenn til og frá stað, har stríðið fer fram, at flyta lóður til eitt stað, har tað verður brúkt í stríði, at fyrireika hernaðartiltøk og at senda stríðsmenn at fremja álop.

§ 114 f
Orðingin "væsentlig økonomisk støtte" er týdd til: "munandi fíggjarstuðul". Mett verður, at hetta er rættari enn "búskaparligur stuðul".

§ 114 h
Skotið verður upp at strika verandi § 114 h. Ásetingin er ein yvirbygningur á lóggávuna um at fyribyrgja spjaðing av hópoyðingarvápnum o.ø. Henda lóggáva er ikki sett í gildi í Føroyum. Tí eru ongar reglur um dupultnýtsluvørur, og ásetingin gevur ikki meining.

Skotið verður samstundis upp at innseta eina nýggja áseting í § 114 h viðvíkjandi peningaligum stuðli ella veitingum frá einum yvirgangsfelagsskapi at brúka til at skipa ella reka stovn ella fyritøku ella til líknandi endamál her á landi.

Endamálið við ásetingini er at mótvirka tann samhuga, ta viðurkenning og tað vald ella tey líkindi fyri at ávirka, sum ein yvirgangsfelagsskapur hevði kunnað fingið við peningaligum stuðli ella veitingum til t.d. vælgerandi endamál.

Ásetingin fevnir um at taka ímóti stuðli sum peningi ella aðrari veiting frá einum bólki ella samskipan, ið fremur ella ætlar at fremja gerð, ið er fevnd av § 114 ella § 114 a. At taka ímóti fíggjarligum stuðli frá einstaklingi, ið fremur ella ætlar at fremja yvirgang, er tí ikki fevnt av ásetingini.

Ásetingin fevnir um peningaligan stuðul og veitingar, sum verða givin at brúka til at skipa ella reka stovn ella fyritøku ella til líknandi endamál her á landi. Tað hevur ikki týdning, hvar í verðini fíggjarligi stuðulin verður fingin, men um stuðulin skal brúkast her á landi.

Peningaligan stuðul ella aðrar veitingar fevna um pening og lutir, sum verða givnir og tikið verður ímóti, tí tey hava peningaligt virði, og tænastuveitingar við peningaligum virði. Lutir, sum bert hava symbolskt virði, eru ikki fevndir av hesum, hóast teir hava ávíst peningaligt virði.

Talan er um stuðul, um peningur ella aðrar veitingar verða givin uttan mótveiting. Talan er eisini um stuðul, um mótveitingin hevur munandi minni fíggjarligt virði. Hetta er t.d. galdandi, um ein yvirgangsfelagsskapur keypir veitingar fyri yvirprís ella selur veitingar fyri undirprís, talan skal tó vera um munandi yvirprís ella undirprís.

Ásetingin fevnir um at taka ímóti. Tilætlan verður kravd, tá ið móttøkan fer fram. Um ein persónur ikki fyrr enn eftir móttøkuna fær tilætlan um, at gevarin er ein yvirgangsfelagsskapur, ella um at givna mótveitingin hevur munandi minni virði enn veitingin, tikið verður ímóti, kann viðkomandi ikki revsast fyri brot á ásetingina. Eftir at viðkomandi hevur fingið henda kunnleika, kann hann revsast, um hann aftur tekur ímóti stuðli frá yvirgangsfelagsskapinum.

Tað hevur ongan týdning, hvussu veitingarnar, sum yvirgangsfelagsskapurin veitir, eru komnar til vega, og eisini veitingar, ið stava frá lógligum virksemi, eru fevndar av hesum. Tað kann revsast fyri brot á ásetingina í samanstoyti við t.d § 290, sum viðvíkur fæloynd, um brotsgerðarevnið í báðum ásetingum er uppfylt.

Bæði privatir og almennir stovnar og privat og almenn virki eru fevnd av hesum, og ognarhátturin hevur ikki týdning. Dømi um stovnar kunnu vera barnagarðar, røktarheim, frískúlar, ítróttarfeløg, bókasøvn, læknahús, neyðhjálparfeløg, fríkirkjur og moskur. Dømi um virki kunnu vera fjølmiðlar, kringvarp ella sjónvarpsstøðir og internetútbjóðarar. Tað er einki krav um, at virkið skal rekast við vinningi fyri eyga.

Ásetingin fevnir eisini um líknandi endamál. Hetta kann til dømis vera konsertir, fyrilestrar, gudstænastur o.a.
Ásetingin fevnir ikki um peningaligan stuðul, sum ikki skal brúkast til at skipa, reka stovn ella virki ella líknandi endamál. Ásetingin fevnir tí ikki um peningaligan stuðul ella veitingar til vanligt undirhald hjá einstaklingum, sum til dømis løn, pensjón ella almannaveitingar til persónar, sum eru ella áður hava verið limir av einum yvirgangsfelagsskapi, ella teirra avvarðandi.

Ásetingin viðvíkur at taka ímóti peningaligum stuðli og veitingum. At geva peningaligan stuðul ella veiting er sostatt ikki revsivert. At geva peningaligan stuðul og veitingar kann heldur ikki revsast sum viðvirkan til at taka ímóti peningaligum stuðli ella veiting. Treytað av endamálinum við peningaligum stuðli ella veitingum kann tann, sum gevur stuðulin, hinvegin eftir umstøðunum revsast fyri at fremja virksemi fyri ein yvirgangsfelagsskap sambært § 114 e í revsilógini.

Skotið verður upp, at revsiramman fyri brot á ásetingina verður fongsul í upp til 6 ár.

Orðingin “modtager økonomisk støtte i penge eller andre ydelser” í donsku revsilógini er týdd til: “tekur ímóti peningaligum stuðli ella veitingum”. “Økonomisk støtte” er í hesum føri ikki týtt, tí mett verður, at hetta liggur í orðingini “peningaligum stuðli ella veitingum”. Ætlanin er ikki at gera innihaldsligar broytingar.

§ 115, stk. 1
Ásetingin er ein skerpan viðvíkjandi brotsverki, sum nevnt er í kapitlunum 25, 26 og 27, sum verður gjørt “mod kongen eller den, som med hjemmel i forfatningen fører regeringen”, uttan at treytirnar fyri at revsa eftir kapitli 12 og 13 eru til staðar.
Ásetingin verður broytt soleiðis, at tað eru brotsverk ímóti tí, sum við heimild í stýrisskipanini leiðir landsstýrið, sum verða revsað. “Stýrisskipanin” skal skiljast sum ein parallellur til “forfatningen” og “landsstýrið” sum ein parallellur til “regeringen”. Sí annars viðmerkingarnar til § 112.

Brotsverk ímóti kongi ella tí, sum við heimild í donsku stjórnarskipanini leiðir stjórn, eru fevnd sambært § 118 b, stk. 1 og 2.

§ 115, stk. 2 í galdandi lóg
Ásetingin viðvíkur somu brotsverkum sum í § 115, stk. 1 ímóti drotning, einkjudrotning ella trónuarvinga.

Skotið verður upp at strika ásetingina og í staðin seta eitt stk. 3 inn í § 118 b, sum skerpir revsingina fyri brotsverk eftir § 115, stk. 1 ímóti drotningini, einkjudrotningini ella trónuarvinganum.

§ 117
Nr. 2
Orðingin "søger at formå nogen" er týdd til: "roynir at fáa onkran til".

Nr. 4
Orðingin "formuefordel" er týdd til: "fíggjarligan fyrimun". "Formuefordel" kann møguliga fatast sum eitt breiðari hugtak enn "fíggjarligan fyrimun". Ætlanin er tó ikki at smalka ásetingina ella at gera innihaldsligar broytingar.

§ 118 a
Orsøkin til, at hendan áseting er varðveitt, er, at tað er ásett í yvirtøkulógini, at brotsverk í kapitli 13, eisini eftir at Føroyar hava yvirtikið revsirættin, framhaldandi skulu lógsøkjast við almennari átalu eftir boðum frá danska løgmálaráðharranum.
Hetta er eisini knýtt at, at hóast revsirætturin er føroyskur, so er ákærumyndugleikin framvegis felags málsøki, og so leingi ákæruvald, politi og dómsvald ikki eru yvirtikin málsøki, er tað danski løgmálaráðharrin, sum er ovasti myndugleiki fyri ákæruvaldið.

§ 118 b
Skotið verður upp, at ein nýggj áseting verður sett inn í § 118 b, sum ásetur, at brotsverk eftir §§ 111–116 somuleiðis verða revsað, um tey verða framd ímóti danska statinum ella myndugleikum tess, herundir kongi, Fólkatingi og Hægstarætti.
Samstundis verður skotið upp at seta eitt nýtt stk. 2 inn, sum ásetur, at um brotsverk, sum eru nevnd í kapitli 25 (brotsverk ímóti lívi og likami), kapitli 26 (brotsverk ímóti persónliga frælsinum) og kapitli 27 (ónáðir og ærumeiðing) verða framd ímóti kongi, uttan at treytirnar fyri at revsa eftir §§ 112 og 113 eru til staðar, kunnu revsingarnar, sum eru nevndar í hesum ásetingum verða herdar upp í tað dupulta. Orðingin "kongur" er at skilja sum verandi ríkisstjóri (regent), eisini um tað – sum í dag – er ein drotning. Ásetingin er ein serstøk revsirættarlig verja av ovasta ríkisstjóra (regenti).
Skotið verður eisini upp at seta eitt nýtt stk. 3 inn, sum hevur við sær, at um somu brotsverk verða framd ímóti drotning, einkjudrotning ella trónuarvinga, kann revsingin vaksa við upp í eini helvt. Við drotning verður eisini javnsettur hjúnafelagi hjá einum kvinnuligum ríkisstjóra.

Til nr. 4
Heitið á kapitli 20
Heitið á kapitli 20 "almenfarlige forbrydelser" er í samráð við Málráðið týtt til: "Alvandasom brotsverk".

§ 180
Orðingin "overhængende fare" er í samráð við Málráðið týdd til: "hóttandi vanda".

Orðingin "plyndring" er týdd til: "púrgan". Orsøkin til, at hetta orðið verður nýtt, er, at "rán" kann verða blandað saman við brotsverkið "rán" í § 188. Málráðið hevur ikki annað uppskot, men sigur tó, at fleiri dømi um "púrga" eru funnin í seðlasavninum á Føroyamálsdeildini.

"Púrgan" merkir "at taka alt frá" at "aloyða" ella "púrgera". Mett verður tí, at hetta orðið kann nýtast í hesum høpi.

§ 181
Orðingin "besvige brandforsikringen" er týdd til: "svika brunatryggingina".

§ 182
Orðingin "ildsvåde" er týdd til: "eldsbruna". Ásetingin er frá 1866, og "ildsvåde" hevur tá havt týdningin "eldsbruna".

§ 183 a
Orðingin "andet kollektivt transportmiddel" er týdd til: "øðrum felagsflutningsfari".

§ 184
Skotið verður upp at strika orðingina "jernbaner", tí ongar jarnbreytir eru í Føroyum.

§ 185
Skotið verður upp at strika orðingina "jernbaneulykke", tí ongar jarnbreytir eru í Føroyum.

§ 187
Stk. 1 nr. 3
Í sambandi við føroyskan av § 187, hevur spurningurin verið reistur, um hvussu setningurin "Den, der med fortielse af den foretagne behandling stiller til salg eller i øvrigt søger at udbrede ting" eigur at verða týddur. Spurningurin hevur serliga verið, hvussu "med fortielse af" eigur at verða týtt og eisini um man eigur at nýta eitt sagnorð ella eitt navnorð, eins og í donsku orðingini.

Skotið hevur verið upp at nýta "í tøgn um", men mett verður, at hetta ikki er eins aktivt sum "fortielse". Tí er "med fortielse af" týtt til: "við dyljing um".
Ætlanin er ikki við hesum at gera innihaldsligar broytingar.

§ 188
Stk. 1
"Med fortielse af" er týtt til: "við dyljing um". Sí annars viðmerking til § 187.

§ 191
Orðingin "et større antal personer" er í samráð við Málráðið týdd til: "fleiri persónum". Vit hava onga orðing á føroyskum fyri "et antal", og Málráðið metir, at hetta er tann rættasta orðingin. Hóast "fleiri persónar" ikki er líka neyvt sum danska orðingin "et større antal personer", er ætlanin ikki at gera innihaldsligar broytingar.

Orðingin "overdrager" er týdd til: "avhendir".

Orðingin "besidder" er í samráð við Málráðið týdd til: "hava um hendi". Í hesum liggur, at ein hevur eitthvørt um hendi, sum ein ikki neyðturviliga eigur. Tað er einki krav, at ein fysiskt hevur tað hjá sær. Tað merkir, at ein hevur tað í varðveitslu ella undir umsiting.

§ 191 a
Skotið verður upp at seta nýggja áseting inn sum § 191 a viðvíkjandi álvarsligum brotum á dopinglóggávuna.

Ásetingin er ein yvirbygnaður á løgtingslóg nr. 85 frá 20. desember 2004 um forboð ímóti ávísum dopingevnum, og ásetur eina skerpaða revsirammu fyri álvarslig brot á dopinglóggávuna. Ætlanin er, at skerpaða revsiramman skal nýtast, tá ið talan er um avhending av dopingevnum til ein størri skara av persónum ella fyri munandi gjald ella undir øðrum serliga skerpandi umstøðum.

Ásetingin er serliga ætlað til skipaðan og víðfevnandi dopinghandil, herundir, tá ið talan er um altjóða netverk, og til einstakar serliga grovar tilburðir.

Tá ið metast skal um, um talan er um serliga skerpandi umstøður, kann dentur leggjast á, um talan er um reglulig brot á dopinglóggávuna, sama um talan er um framleiðslu, inn- og útflutning, sølu, útbreiðslu ella at hava slík evni á hondum við tí í hyggju at avhenda tey, herundir um talan er um ólógligt virksemi, t.d. um gerningsmaðurin fast útvegar størri mongdir av dopingevnum til keyparar í størri tali á venjingarmiðstøðum (heilsølulíknandi virksemi).

Aðrar serliga skerpandi umstøður fevna t.d. um útbreiðslu av serliga vandamiklum dopingevnum, hóast talan er um smærri nøgdir. Øll dopingevni, ið eru forboðin, mugu roknast sum vandamikil, men tað, sum her verður hugsað um, eru føri, har ítøkiliga kemiska samansetingin hevur ella kann hava álvarsligar vandar fyri mannalív og heilsustøðu.

Skotið verður upp, at revsiramman verður fongsul í upp til 6 ár.

Ásetingin er ikki bara ætlað at verða nýtt, tá ið revsiramman í lóg um forboð móti ávísum dopingevnum ikki slær til. Ætlanin er eisini, at ásetingin kann nýtast, tá ið talan er um so grovar gerðir, at ásetingin í revsilógini eigur at verða nýtt, heldur enn lóg um forboð móti ávísum dopingevnum. Hetta er galdandi, hóast ítøkiliga revsingin verður sett til fongsul í minni enn 2 ár.

Stk. 1 viðvíkur avhending. Ásetingin fevnir ikki einans um sølu, men eisini um ókeypis avhending av dopingevnum, til dømis fyri at upparbeiða ein marknað.

Stk. 2 viðvíkur ymsar fyrireikandi gerðir, sum verða gjørdar fyri síðan at avhenda dopingevni.

Brot, sum ikki koma undir § 191 a, verða framvegis viðgjørd eftir lóg um forboð móti ávísum dopingevnum.

Ætlanin er ikki við hesum uppskoti at skerpa revsingina í mun til ta revsing, sum í dag verður givin fyri dopingbrotsverk.

Orðingin “et større antal personer” er í samráð við Málráðið týdd til: “fleiri persónum”. Vit hava onga orðing á føroyskum fyri “et antal”, og Málráðið metir, at hetta er tann rættasta orðingin. Hóast “fleiri persónar” ikki er líka neyvt sum danska orðingin “et større antal personer”, er ætlanin ikki at gera innihaldsligar broytingar.

Orðingin “overdrager” er týdd til: “avhendir”.

Orðingin “besidder” er í samráð við Málráðið týdd til: “hava um hendi”. Í hesum liggur, at ein hevur eitthvørt um hendi, sum ein ikki neyðturviliga eigur. Tað er einki krav, at ein fysiskt hevur tað hjá sær. Tað merkir, at ein hevur tað í varðveitslu ella undir umsiting.

§ 192 a
Danska orðingin “besidder” er í samráð við Málráðið týdd til: “hava um hendi”. Í hesum liggur, at ein hevur eitthvørt um hendi, sum ein ikki neyðturviliga eigur. Tað er einki krav, at ein fysiskt hevur tað hjá sær. Tað merkir, at ein hevur tað í varðveitslu ella undir umsiting.

Skotið verður upp at strika stk. 2 í ásetingini, sum viðvíkur brot á løgtingslóg nr. 43 frá 22. mai 1969 um vápn o.a. og løgtingslóg um spreingievni og spreingiarbeiði v.m. Orsøkin til, at mælt verður til at strika stk. 2, er tann, at ongar reglur eru um at útflyta vápn og um at menna ella við menning í huga at granska í vápnum og spreingievnum.

§ 192 b
Stk. 1
Danska orðingin “besidder” er í samráð við Málráðið týdd til: “hava um hendi”. Í hesum liggur, at ein hevur eitthvørt um hendi, sum ein ikki neyðturviliga eigur. Tað er einki krav, at ein fysiskt hevur tað hjá sær. Tað merkir, at ein hevur tað í varðveitslu ella undir umsiting.

Stk. 3
Danska orðingin “nærliggende fare” er týdd til: “nærliggjandi vanda”.

Til nr. 5

§ 193, stk. 2
Skotið verður upp, at ásetingin bert fer at fevna um órógv í rakstrinum av vanligum samskiftis- ella samferðslutólum, sum er framd av grovum ósketni. Hetta er í samsvari við danska lóggávu, sum varð broytt í 2004. Av misgáum er hendan broyting ikki komin við, tá ið revsilógin kom á føroyskar hendur.

§ 195
Danska orðingin “levnedsmiddel” er týdd til: “matvøru”. Av tí at einki føroyskt orð er fyri “levnedsmiddel”, verður mett, at orðingin “matvøru” kann nýtast. Ætlanin er ikki at smalka týdningin av ásetingini við hesi týðing.

§ 196
Stk. 1
Danska orðingin “nærliggende fare” er týdd til: “nærliggjandi vanda”.

Stk. 2
Í danska tekstinum verður orðingin “overtrædelser” nýtt í fleirtali. Á føroyskum er vanligari at nýta eintal, og orðingin er tí týdd til: “brotið”. Ætlanin er ikki við hesum at gera innihaldsligar broytingar.

Til nr. 6

§ 197
Orðingin “betleri” er týdd til: “bidding”.

§ 199
Stk. 1.
Í galdandi lóggávu stendur: "Hengiver nogen sig til lediggang", hetta er týtt til: "Gongur nakar fyri einki", orðingin: "at hann ikke søger at ernære sig på lovligt vis" er týdd til: "at hann ikki roynir at vinna sær til lívsins uppihald á lógligan hátt". Ætlanin er ikki at broyta galdandi rættarstøðu við hesari orðing.

Stk. 2.
§ 199 er avtikin í Danmark í 1999, so at prostitutión er avkriminaliserað har. Ætlanin er at halda fast við ásetingina, tó so at ásetingin hereftir verður óheft av kyni. Í galdandi lóggávu er ásett, at: "spil, utugt eller understøttelse fra kvinder, der ernærer sig ved utugt" ikki er at rokna sum lógligt starv. Hetta er týtt til: "spæl, prostitutión og tað at liva av uppihaldi, sum stavar frá prostitutión". Ásetingin er sostatt víðkað til eisini at galda uppihald frá mannligum prostitueraðum.
Mett verður, at um haldast skal fast við hesa áseting, eigur tað sama at vera galdandi fyri bæði kyn. Hetta er eisini í samsvari við Kvinnusáttmálan.
Orðið "utugt" er týtt til: "prostitutión", hetta er ein nútímansgerðing av orðinum og er í samsvari við tær orðingar, sum verða nýttar í kapitli 24: Kynslig brotsverk.

§ 203
Danska orðingin "hasardspil" er týdd til: "váðaspæl".

Til nr. 7

§ 215
Danska orðingin "unddrager en person forældres myndighed eller forsorg" er týdd til: "heldur einum persón frá myndugleika ella umsorgan hjá foreldrum". Orðingin " heldur frá" snýr seg um eitt longri tíðarskeið og verður tí mett at vera rætta týðingin í hesum førinum.

Til nr. 8
Í § 125 a, 2. pkt. verður "tá ið talan er um reglulig ella skipað brotsverk" broytt til: " tá ið talan er um brot av meira regluligum ella skipaðum slag".
Orsøkin til broytingina er, at orðingin í galdandi lóggávu er ikki nóg neyv og kann verða tulkað so, at hon setur strangari krøv til próvbyrðuna, enn skulu setast við nýggju orðingini. Talan er um brotsverk, sum hava "systematisk eller organiseret karakter", og í hesum liggur ikki, at brotsverkið er beinleiðis regluligt ella skipað, men heldur ber brá av at vera regluligt ella skipað.

Til nr. 9
Í § 236, stk. 1, 2. pkt. verður "har ið talan er um regluliga ella skipaða útbreiðslu" broytt til: "har ið útbreiðslan er av meira regluligum ella skipaðum slag". Orsøkin til broytingina er tann, at orðingin í galdandi lóggávu er ikki nóg neyv og setur munandi stangari krøv til próvbyrðuna. Talan er um útbreiðslu, sum hevur meira "systematisk eller organiseret karakter". Sí eisini undir nr. 8.

Til nr. 10
Føroya Rættur hevur gjørt vart við, at týðingin av donsku orðingini í § 236, stk. 2 "besidder eller mod vederlag" ikki er nóg neyv. Ásetingin viðvíkur av hava pornografiskar, visuellar endurgevingar ella tílíkt av persónum undir 18 ár um hendi. Hetta merkir ikki neyðturviliga, at ein eigur tað. Tað er heldur einki krav, at ein fysiskt hevur tað hjá sær. Skotið verður tí upp, at

orðingin “eigur” verður broytt til: “hevur um hendi”, sum er eitt víðari hugtak enn at “eiga”. Somuleiðis er orðingin “keypir” ov avmarkandi í mun til donsku orðingina “mod vederlag”. Skotið verður tí upp, at hetta verður broytt til: “ímóti gjaldi”.

Til nr. 11
Í sambandi við týðingina av hesum kapitlum hevur verið tosað um, hvussu hugtakið “nærliggende” best verður týtt. Sprotin hevur nýtt orðið “nærliggjandi” í sambandi við dátuverndarlógina, og tí verður hildið best at nýta somu orðing her.
Tað hevur stóran týdning, at orðingarnar í revsilógini vera nýttar líka allastaðni. Sum avleiðing av hesum vera orðingar sum fyrr eru nýttar í § 252, stk. 1 og í § 299 a broyttar til “nærliggjandi” soleiðis at hesar samsvara við orðingarnar í hesum kapitli. Ætlanin er ikki at gera nakra aðra broyting innihaldsliga.

Til nr. 12 og 13
Í sambandi við dagføringina av kapitli 12, 13 og 20–23 eru vit vorðin varug við, at orðingin “systematisk eller organiseret karakter” eigur at týðast til “av regluligum ella skipaðum slag”. Hesar orðingar verða tí broyttar allastaðni, har tær koma fyri. Sí annars broyting nr. 8 og 9.
Orðingin “gerðir” er broytt til “brot”. Hetta samsvarar betur við donsku orðingina “overtrædelser”.

Til nr. 14
Í sambandi við føroyskan av kapitlunum í hesum uppskoti er orðingin “nærliggende fare” týdd til: “nærliggjandi vanda”. Mett verður, at orðingar í revsilógini í mest møguligan mun eiga at týðast eins. Hetta er orsøkin til hesa broyting.

Til nr. 15
Í § 114 a, stk. 1 er sett eitt nýtt nr. 7. Av tí at sáttmálin ikki er settur í gildi í Føroyum, eru tær ásetingar, sum víst verður til í sáttmálanum, lagdar við í skjali 1. Av tí at yvirskriftir í skjalinum hava verið á donskum, er skjalið umorðað, so at tær nú eru á føroyskum.

Til § 2
Samstundis sum løgtingslógin kemur í gildi, verður skotið upp at seta úr gildi lov nr. 149 af 2. august 1914, hvorved det forbydes fra dansk territorium at understøtte krigsførende magter. Lógin er sett úr gildi í Danmark, tí hon ongan praktiskan týdning hevur longur. Mett verður, at lógin heldur ongan praktiskan týdning hevur í Føroyum.

Løgmansskrivstovan, 28. oktober 2020

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður

/ Marjun Hanusardóttir

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Orðalisti
Fylgiskjal 3: Ummælissvar frá Fíggjarmálaráðnum
Fylgiskjal 4: Ummælissvar frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum
Fylgiskjal 5: Ummælissvar frá Heilsumálaráðnum
Fylgiskjal 6: Ummælissvar frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum
Fylgiskjal 7: Ummælissvar frá Almannamálaráðnum
Fylgiskjal 8: Ummælissvar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 9: Ummælissvar frá Fiskimálaráðnum
Fylgiskjal 10: Ummælissvar frá Føroya Rætti
Fylgiskjal 11: Ummælissvar frá Færøernes Politi
Fylgiskjal 12: Ummælissvar frá MEGD
Fylgiskjal 13: Ummælissvar frá Føroya Kommunufelag
Fylgiskjal 14: Ummælissvar frá Sinnisbata